VINNUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið

Tórshavn, tann 6. juli 2006
Vmr J.Nr.: 200600129/
Imr J. Nr.: /

Viðgjørt:

**Løgtingsmál nr. xx/2005: Uppskot til løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin)**

# Uppskot

# til

# løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin)

## PARTUR I
## Øki lógarinnar

### Kapittul 1
### Tey tryggjaðu

*Arbeiðstakarar*

**§ 1.** Hvør tann, sum fyri løn ella óløntur verður settur í starv hjá føroyskum arbeiðsgevara at arbeiða støðugt ella fyribils á føroyskum landøki, sjóøki og loftrúmi yvir nevndu økjum, er tryggjaður móti avleiðingunum av arbeiðsskaða sambært ásetingunum í hesi lóg, sí tó stk. 2 og 3, § 3 og § 7.

*Stk. 2.* Húskið arbeiðsgevarans er bert tryggjað, um arbeiðsviðurskifti teirra kunnu javnmetast við vanlig arbeiðstakaraviðurskifti.

*Stk. 3.* Hjúnafelagi arbeiðsgevarans er bert tryggjaður, um hjúnafelagarnir hava eina sínámillum lønaravtalu, sum, tá arbeiðsskaðin hendi, lýkur krøvini í skattalóggávuni.

**§ 2.** Tryggingin fevnir um alt arbeiði fyri arbeiðsgevaran, herímillum arbeiði í virki hansara, uttan mun til um tað er vinnuligt ella ikki, arbeiði í persónliga húsarhaldi arbeiðsgevarans, ella tá persónligar tænastur annars verða veittar arbeiðsgevaranum ella húski hansara.

**§ 3.** Javnmett við teir í § 1 nevndu persónar er sjófólk, sum arbeiðir umborð á føroyskt skrásettum skipi, statt uttan fyri føroyskt sjóøki.

*Sjálvstøðugt vinnurekandi*

**§ 4.** Øll sjálvstøðugt vinnurekandi, sum virka á føroyskum landøki, sjóøki ella loftrúmi, eru tryggjað móti avleiðingunum av arbeiðsskaða samsvarandi ásetingunum í hesi lóg, sí § 15.

*Stk. 2.* Sjálvstøðugt vinnurekandi sambært hesi lóg er hvør tann, sum við fíggjarligum vinningi fyri eyga einsamallur ella í felag við onnur rekur vinnu fyri egna rokning og ábyrgd.

*Onnur tryggjaði*

**§ 5.** Tryggjað er eisini livandi føtt barn, sum í móðurlívi hevur fingið sjúku orsakað av einum av hesi lóg fevndum arbeiði, sum móðirin hevði, meðan hon var við barn.

*Stk. 2.* Um tað seinni verður staðfest, at árin á foreldrini frammanundan gitnaðinum ella eftir føðingina, hava havt skaðiliga ávirkan á

TINGANES • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 35 60 60 • TELEFAX 35 60 65 • E-MAIL: VMR@VMR.FO

fostur ella barn, kunnu tílíkir skaðar viðurkennast sum arbeiðsskaðar samsvarandi reglunum í § 10.

**§ 6.** Tryggjaðir eru eisini persónar:
1. í yrki teirra sum borgarligt ella kommunalt umboð,
2. í yrki sum álitisumboð fyri starvsfólkið á arbeiðsplássinum,
3. sum royna at bjarga mannalívi, fyribyrgja vanlukkum ella verja fyri stórvegis evnisligum ella mentarnarligum missi, um royndin hóast hon ikki kann metast sum partur av arbeiðinum, sbr. § 1, kortini verður framd í sambandi við vanliga arbeiði teirra, og
4. sum royna at bjarga mannalívi á føroyskum landøki, sjóøki ella loftrúmi, hóast royndin ikki verður framd í sambandi við arbeiði teirra.

**§ 7.** Landsstýrismaðurin kann, samsvarandi reglum í sáttmála við onnur lond, áseta reglur um, at eisini onnur koma undir hesa lóg, herímillum:
1. persónar, sum føroyskur arbeiðsgevari fyribils sendir út í onnur lond at arbeiða fyri seg,
2. persónar, sum fyri útlendskan arbeiðsgevara arbeiða her á landi ella umborð á útlendskt skrásettum skipi, boripalli ella líknandi á føroyskum sjóøki,
3. persónar undir útbúgving og
4. persónar undir forsorg.

## Kapittul 2
## Arbeiðsskaðar

**§ 8.** Arbeiðsskaðar sambært hesi lóg eru:
1. vanlukkutilburðir, ið standast av arbeiðinum ella teimum viðurskiftum, arbeitt verður undir,
2. stutttíðar skaðilig árin, ið vara í mesta lagi 5 dagar, og sum standast av arbeiðinum ella teimum viðurskiftum, arbeitt verður undir,
3. brádliga hendir lyftiskaðar sambært útgreiningini í § 9 og
4. vinnusjúkur sambært útgreiningini í § 10.

**§ 9.** Við brádliga hendar lyftiskaðar skilst varandi vødda-, nerva- ella liðskaðar, sum av sær sjálvum og við beinleiðis tilknýti til óvanliga lyftistøðu henda persónum, sum dagliga fáast við tyngjandi lyftiarbeiði, tó treytað av, at skaðin bert ella í høvuðsheitum er elvdur av hesum lyftiarbeiði.
*Stk. 2.* Hevur dagurin, tá arbeiðsskaðin hendi, rættarvirknað, verður hesin viðvíkjandi brádliga hendum lyftiskaðum roknaður frá tí degi, lyftiskaðin hendi.

**§ 10.** Vinnusjúkur eru:
1. sjúkur, sum eftir læknafrøðiligum og tøkniligum royndum eru elvdar av serligum árinum, sum ávísir persónsbólkar, orsakað av arbeiði teirra ella viðurskiftunum, arbeitt verður undir, verða ávirkaðir av í størri mun enn persónar uttan tílíkt arbeiði. Harumframt sjúkur, sum livandi fødd børn hava fingið í móðurlívi orsakað av arbeiði, móðirin hevði, ímeðan hon var við barn. Landsstýrismaðurin ásetir við kunngerð, eftir tilmæli frá Vanlukkutryggingarráðnum, hvørjar sjúkur kunnu viðurkennast sum tílíkar vinnusjúkur. Landsstýrismaðurin kann í hesum sambandi áseta, at sjúkur bert eru fevndar av lógini, um tær eru elvdar av arbeiði í ávísum virkisøki, ella aðrar serligar treytir eru loknar.
2. aðrar sjúkur, m.a. sjúkur sum livandi fødd børn hava fingið í móðurlívi, um tað verður prógvað, annaðhvørt at sjúkan eftir nýggjastu læknafrøðiligu royndunum lýkur krøvini, nevnd í nr. 1, 1. og 4. pkt., ella sjúkan bara ella í høvuðsheitum verður hildin at vera elvd orsakað av serligum arbeiðsumhvørvi.

*Stk. 2.* Sjúkur elvdar av árinum á foreldrini frammanundan gitnaðinum ella eftir føðingina, kunnu við broyting av kunngerðini, nevnd í stk. 1, nr. 1, verða

viðurkendar sum vinnusjúkur, ella viðurkendar sum vinnusjúkur sambært stk. 1, nr. 2, um tað seinni verður prógvað, at hesi árin á foreldrini hava havt skaðiliga ávirkan á fostrið ella barnið.
*Stk. 3.* Um ikki annað er ásett í hesi lóg, hava vinnusjúkur rættarvirknað frá tí degi, sjúkan verður fráboðað sambært reglunum í 5. kapitli.

## Kapittul 3
## Tey tryggingarskyldugu

*Arbeiðsgevari*

**§ 11.** Hvør tann, sum setir fólk í arbeiði samsvarandi §§ 1-3, er arbeiðsgevari í lógarinnar týdningi og hevur skyldu til at tryggja arbeiðsfólkið móti avleiðingunum av arbeiðsskaða samsvarandi ásetingunum í hesi lóg, sí tó stk. 2, § 12 og § 16, stk. 2.
*Stk. 2.* Tryggingarskylda er tó ikki fyri persónar, sum arbeiða í persónliga húsarhaldi arbeiðsgevarans, ella veita arbeiðsgevaranum ella húski hansara persónligar tænastur annars, um starvstíðin samanlagt er minni enn 100 tímar í einum álmanakkaári.

**§ 12.** Reiðari á skipi, sum er ella skal verða skrásett í Føroysku Skipaskránni ella Føroysku Altjóða Skipaskránni, hevur skyldu til at tryggja ein og hvønn persón, fevndur av § 1, sum er settur í starv at arbeiða umborð á skipinum eftir skiparans ávísing, sjálvt um annar enn reiðarin hevur sett tey í starv ella lønir teimum, og sjálvt um arbeiðið fevnir um annað enn raksturin av skipinum.
*Stk. 2.* Reiðarin hevur eisini skyldu til at tryggja persónar, sum heilt ella partvíst eru eigarar av skipinum, og sum arbeiða umborð á hesum, uttan so, at skipið einans verður nýtt til stuttleikasigling.

**§ 13.** Tryggingarskyldugur arbeiðsgevari er tann arbeiðsgevari, í hvørs tænastu arbeiðsskaðin hendi, sí tó stk. 2 og 3.
*Stk. 2.* Er talan um brádliga hendan lyftiskaða, sbr. § 9, er tryggingarskyldugi arbeiðsgevarin tann arbeiðsgevarin, í hvørs tænastu lyftiskaðin hendi, tó ikki, um tað verður prógvað, at skaðin er elvdur av arbeiði fyri annan arbeiðsgevara.
*Stk. 3.* Er talan um vinnusjúku, sbr. § 10, áliggur tryggingarskyldan tí arbeiðsgevara, í hvørs tænastu tann sjúki seinast áðrenn staðfestingina av sjúkuni hevur verið fyri skaðiligum árinum, ið kunnu haldast at hava elvt til viðkomandi sjúku, tó ikki, um tað verður prógvað, at sjúkan er elvd av arbeiði fyri annan arbeiðsgevara.

**§ 14.** Ein arbeiðsgevari, ið hevur átikið sær eitt arbeiði, hevur skyldu til eisini at tryggja tey arbeiðsfólk, ið hin sáttmálaparturin letur honum til tess at útinna hetta arbeiðið.
*Stk. 2.* Tann, ið rekur vinnuvirki, ella útinnir tryggingarskyldugt arbeiði, hevur skyldu at tryggja tey arbeiðsfólk, sum eru knýtt at virkinum ella arbeiðinum, sjálvt um arbeiðsfólkið er sett í starv av øðrum arbeiðsgevara, sum hevur átikið sær at útinna ein part av arbeiðinum. Hevur hesin seinni arbeiðsgevarin sjálvur tryggjað sítt arbeiðsfólk, er hann tryggingarskyldugur arbeiðsgevari.

*Sjálvstøðugt vinnurekandi*

**§ 15.** Øll sjálvstøðugt vinnurekandi hava skyldu til at tryggja sín egna persón móti avleiðingunum av arbeiðsskaða sambært ásetingunum í hesi lóg.

## Kapittul 4
## Arbeiðsskaðatryggingin

*Tekning av arbeiðsskaðatrygging*

**§ 16.** Allir tryggingarskyldugir arbeiðsgevarar, herundir allar tær føroysku kommunurnar, umframt øll sjálvstøðugt vinnurekandi, skulu lata ábyrgdarvandan eftir hesi lóg til tryggingarfelag, ið sambært løgtingslóg um tryggingarvirksemi hevur loyvi at tekna arbeiðsskaðatryggingar í Føroyum.

*Stk. 2.* Landið hevur tó ikki skyldu til at lata ábyrgdarvandan sambært hesi lóg til eitt tryggingarfelag.

*Misrøking av tryggingarskylduni*

**§ 17.** Tryggingarskyldugur arbeiðsgevari og sjálvstøðugt vinnurekandi, sum ikki hava teknað tær sambært hesi lóg kravdu tryggingar, ella sum ikki hava varðveitt tílíkar tryggingar í gildi, skulu heilt ella partvíst rinda eina upphædd, svarandi til tryggingargjøldini, ið áttu at verið goldin einum tryggingarfelag, umframt rentu, ið er 1% yvir diskonto Tjóðbankans. Upphæddin verður samsvarandi nærri reglum, ásettar av landsstýrismanninum, lutfalsliga býtt ímillum tey tryggingarfeløg, ið tekna arbeiðsskaðatryggingar í Føroyum.

*Stk. 2.* Er talan um sjálvstøðugt vinnurekandi, verða skyldug tryggingargjøld mótroknað í veitingunum sambært lógini, sum tann sjálvstøðugt vinnurekandi ella hansara eftirsitandi fáa útgoldið í sambandi við arbeiðsskaða.

*Stk. 3.* Um serligar umstøður tala fyri tí, kann Vanlukkutryggingarráðið heilt ella partvíst frítaka tryggingarskylduga arbeiðsgevaran ella tann sjálvstøðugt vinnurekandi fyri at rinda skyldug tryggingargjøld. Somuleiðis kann Vanlukkutryggingarráðið í serligum førum avgera, at skyldug tryggingargjøld hjá sjálvstøðugt vinnurekandi heilt ella partvíst ikki skulu verða mótroknað í veitingum sambært lógini.

*Stk. 4.* Tryggingarfelagið hevur útpantingarrætt fyri skyldug tryggingargjøld, rentur og aðrar útreiðslur hesum viðvíkjandi.

*Skyldur tryggingarfelagsins*

**§ 18.** Tá ið tryggingarfelag hevur átikið sær ábyrgdarvandan hjá tryggingarskyldugum arbeiðsgevara ella sjálvstøðugt vinnurekandi, ábyrgdast tryggingarfelagið mótvegis tryggjaða, sjálvt um tað átók sær ábyrgdarvandan undir skeivum fortreytum.

**§ 19.** Tryggingin sambært hesi lóg fevnir um tann persónskaða, sum er elvdur av arbeiðsskaðanum, hóast skaðin í sjálvum sær er lítil í mun til samlaðu heilsustøðu hins tryggjaða.

*Stk. 2.* Er ein persónskaði ikki einans elvdur av fráboðaða tilburðinum, skal tryggjaði hava boð um hetta í seinasta lagi, tá Vanlukkutryggingarráðið sambært § 29 kunnar tryggjaða um, hvørt tilburðurin kann viðurkennast sum ein arbeiðsskaði.

**§ 20.** Tryggjaðir eru ikki vanlukkutilburðir, ið standast av herstríði, burtursæð frá vanlukkutilburðum, ið henda á sjónum.

*Tryggingarfulnaðurin í serligum førum*

**§ 21.** Er arbeiðsskaði hendur, sum tryggingarskyldugur arbeiðsgevari ella sjálvstøðugt vinnurekandi ikki hevur tryggjað, verða útreiðslurnar, nevndar í § 25, stk. 1, § 28, stk. 4 og § 37, stk. 3, umframt veitingarnar, sbr. § 38, rindaðar av øllum tryggingarfeløgunum, ið tekna arbeiðsskaðatryggingar í Føroyum, samsvarandi nærri reglum ásettar av landsstýrismanninum. Er talan um sjálvstøðugt vinnurekandi, verða ásetingarnar í § 17, stk. 2 og 3 eisini nýttar.

*Stk. 2.* Ásetingarnar í stk. 1 verða nýttar samsvarandi í sambandi við arbeiðsskaðar, ið henda persónum, sum arbeiðsgevarin, sbr. § 11, stk. 2, ikki hevur skyldu at tryggja.

*Stk. 3.* Ásetingarnar í stk. 1 verða nýttar samsvarandi, um ein ávísur tryggingarskyldugur arbeiðsgevari ikki kann ávísast eftir reglunum í § 13, stk. 2 og 3, ella um eitt ávíst tryggingarfelag ikki kann ávísast, tí arbeiðsgevarin er givin við virkseminum, eftir at arbeiðsskaði er hendur í tænastu hansara.

*Stk. 4.* Velur landið ikki at lata ábyrgdarvandan sambært hesi lóg til eitt tryggingarfelag, verða allar tær útreiðslur, sum annars vórðu rindaðar av tryggingarfeløgum, rindaðar av landinum.

**§ 22.** Ávíkavist landskassin, sb. § 16, stk. 2, ella tryggingarfelagið rindar málsviðgerðarútreiðslurnar, umframt veitingarnar til teir í § 6, nr. 1 nevndu persónar. Ásetingarnar í § 21 verða nýttar samsvarandi.

*Stk. 2.* Tryggingarfelagið rindar málsviðgerðarútreiðslurnar umframt veitingarnar til teir í § 6, nr. 2 nevndu persónar. Ásetingarnar í § 21 verða nýttar samsvarandi.
*Stk. 3.* Landskassin rindar málsviðgerðarútreiðslurnar umframt veitingarnar til teir í § 6, nr. 3 og nr. 4 nevndu persónar.

## PARTUR II
## Fráboðan, málsviðgerð og kæra

### Kapittul 5
### Fráboðan um arbeiðsskaðar

*Fráboðanarfreistir*

**§ 23.** Ein hvør tilburður, sum hildin verður tryggjaður sambært hesi lóg, skal skjótast gjørligt og í seinasta lagi 7 yrkadagar eftir hendingina verða fráboðaður Vanlukkutryggingarráðnum.
*Stk. 2.* Um tilburðurin ikki er fráboðaður samsvarandi stk. 1, og skaddi ella sjúki 5 vikur eftir hendingina framvegis ikki er førur fyri í fullan mun at taka upp aftur vanliga arbeiðið, skal tilburðurin innan 7 yrkadagar eftir hetta verða fráboðaður Vanlukkutryggingarráðnum.
*Stk. 3.* Fyri vinnusjúkur, sbr. § 10, verður fráboðanarfreistin roknað frá tí degi, tann fráboðanarskyldugi gjørdist varugur við, at sjúkan kann vera treytað av arbeiðinum.
*Stk. 4.* Vanlukkutryggingarráðið skal innan 48 tímar hava fráboðan um andlát, ið kunnu verða elvd av arbeiðsskaða, herímillum øll andlát hend á arbeiðsplássum. Fráboðanarskyldan er galdandi, hóast tilburðurin, ið kann hava elvt til andlátið, longu frammanundan er ella skal verða fráboðaður ráðnum.
*Stk. 5.* Boðar tann fráboðanarskyldugi, sbr. § 24 ikki Vanlukkutryggingarráðnum frá møguligum arbeiðsskaða, ella verður tilburðurin fráboðaður ov seint, kann tryggjaði ella avvarðandi hansara innan eitt ár eftir tilburðin kortini seta fram krav um veitingar sambært hesi lóg. Ásetingarnar í stk. 3 verða nýttar samsvarandi. Um serligar umstøður tala fyri tí, kann ráðið síggja burtur frá 1 ára fráboðanarfreistini.

*Fráboðanarskyldan*

**§ 24.** Tryggingarskyldugi arbeiðsgevarin og landið, har ongin trygging er teknað, sbr. § 16, stk. 2, hava fráboðanarskylduna viðvíkjandi starvsfólki sínum, herundir eisini teimum í § 11, stk. 2 nevndu persónum.
*Stk. 2.* Er talan um sjálvstøðugt vinnurekandi, ella persón, sum roynir at bjarga mannalívi, sbr. § 6, nr. 4, hevur tryggjaði sjálvur ella hansara avvarðandi fráboðanarskylduna.
*Stk. 3.* Læknar og tannlæknar hava eisini skyldu til at boða Vanlukkutryggingarráðnum og øðrum avvarandi eftirlitsstovnum frá øllum tilburðum, sum teir í yrki sínum gerast varugir við kunnu vera vinnusjúkur ella brádliga hendir lyftiskaðar.

*Mannagongdin í sambandi við fráboðan um arbeiðsskaða*

**§ 25.** Við fráboðan um arbeiðsskaða sambært hesi lóg skal fylgja læknaváttan, ið verður rindað av tryggingarfelagnum ella landinum, sbr. § 21, stk. 4. Ásetingarnar í §§ 21 og 22 verða nýttar samsvarandi.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir eftir tilmæli frá Vanlukkutryggingarráðnum nærri reglur um mannagongdina í sambandi við fráboðanir um arbeiðsskaðar, herímillum hvussu fráboðanin skal fremjast, hvørji oyðubløð skulu nýtast, hvørjar læknaváttanir skulu fylgja við fráboðanini og gjøldini fyri hesar læknaváttanir.

## Kapittul 6
## Málsviðgerðin

*Vanlukkutryggingarráðið*

**§ 26.** Vanlukkutryggingarráðið tekur avgerð í málum um arbeiðsskaðatrygging sambært hesi lóg.

*Stk. 2.* Eftir áheitan og móti einum av landsstýrismanninum ásettum gjaldi kann Vanlukkutryggingarráðið eisini geva vegleiðandi ummæli um persónskaða, sum ikki er fevndur av hesi lóg.

**§ 27.** Vanlukkutryggingarráðið er mannað við einum dómara frá Føroya Rætti sum formanni, Landslæknanum í Føroyum, umframt 3 limum, sum landsstýrismaðurin velur fyri 4 ár í senn. Harumframt velur landsstýrismaðurin 3 varalimir fyri 4 ár í senn.

*Stk. 2.* Limir og varalimir í Vanlukkutryggingarráðnum mugu ikki starvast hjá ella taka lut í leiðsluni í tryggingarfelag, sum teknar arbeiðsskaðatryggingar í Føroyum.

*Stk. 3.* Vanlukkutryggingarráðið skal hava skrivara, sum hevur lokið løgfrøðiligt embætisprógv, ella annað viðkomandi prógv frá hægri lærustovni.

*Stk. 4.* Vanlukkutryggingarráðið kann undir einstøku málsviðgerðini leita sær sakkøna hjálp.

*Stk. 5.* Vanlukkutryggingarráðið ger uppskot um reglugerð fyri virksemi sítt, sum skal góðkennast av landsstýrismanninum.

*Stk. 6.* Umsitingarútreiðslurnar, ið Vanlukkutryggingarráðið hevur av hesi lóg, herímillum samsýning til limir og varalimir í ráðnum, verða rindaðar av landskassanum.

*Málsviðgerðin í Vanlukkutryggingarráðnum*

**§ 28.** Vanlukkutryggingarráðið kann sum liður í málsviðgerðini krevja innlit í allar viðkomandi upplýsingar frá øllum myndugleikum, stovnum, arbeiðsgevarum, tryggjaða umframt øðrum, sum hava upplýsingar av týdningi fyri málið.

*Stk. 2.* Vanlukkutryggingarráðið kann krevja líkuppskurð framdan eftir reglunum um loyvdar líkuppskurðir. Somuleiðis kann ráðið krevja rættarfrágreiðing samsvarandi ásetingunum í rættargangslógini, eins og ráðið kann senda sakkøn fólk at gera kanningar á arbeiðsplássum o.ø.

*Stk. 3.* Tryggjaði hevur skyldu til at gera eftir teimum boðum, sum Vanlukkutryggingarráðið heldur hava týdning fyri málsviðgerðina, herundir lata seg kanna av lækna, lata seg innleggja á sjúkrahús og líknandi til nærri kanningar, lata seg arbeiðsroyna og at møta fyri ráðnum at geva nærri frágreiðing.

*Stk. 4.* Útreiðslurnar, ið standast av ásetingunum í stk. 1-3, herímillum útreiðslur til læknaváttanir, umframt ferðaútreiðslur, ið standast av, at tryggjaði fylgir boðum, givin sambært stk. 3, verða rindaðar av tryggingarfelagnum ella landinum, sbr. § 21, stk. 4. Eisini rindar tryggingarfelagið ella landið, sbr. § 21, stk. 4, endurgjald fyri próvførda mista arbeiðsinntøku yvir 2 tímar í sambandi við, at tryggjaði lýkur sínar skyldur sambært stk. 3; sum grundarlag fyri hesum endurgjaldi verður árslønin, sbr. § 42, nýtt. Ásetingarnar í §§ 21 og 22 verða nýttar samsvarandi.

*Freistir Vanlukkutryggingarráðsins*

**§ 29.** Vanlukkutryggingarráðið skal í seinasta lagi 3 mánaðir eftir fráboðan um vanlukkutilburð, sbr. § 8, nr. 1, ella stutttíðar skaðilig árin, sbr. § 8, nr. 2, kunna tryggjaða ella hansara avvarðandi, hvørt tilburðurin kann viðurkennast sum ein arbeiðsskaði, ið kann geva rætt til veitingar sambært lógini. Er talan um sjúku, sbr. § 10, stk. 1, nr. 1, er freistin 9 mánaðir. Samstundis skal viðkomandi arbeiðsgevari kunnast um avgerðina.

*Stk. 2.* Fyri sjúkur, nevndar í § 10, stk. 1, nr. 2 og § 10, stk. 2, umframt brádliga hendar lyftiskaðar, sbr. § 9, galda einans tær í § 48, stk. 2 og § 56, stk. 2 ásettu freistir fyri støðutakanina til avleiðingarnar av einum viðurkendum arbeiðsskaða.

*Stk. 3.* Somu freistir, sum ásettar í stk. 1, eru galdandi fyri fráboðan til avvarðandi, tá tryggjaði doyr, eftir at ein tilburður honum viðvíkjandi er fráboðaður Vanlukkutryggingarráðnum. Í hesum førum verða freistirnar roknaðar frá tí degi, ráðið, sbr. § 23, stk. 4, fekk fráboðan um andlátið.

*Stk. 4.* Vanlukkutryggingarráðið kann í serligum førum víkja frá tríggjar mánaða freistini sambært stk. 1.

**§ 30.** Hóast Vanlukkutryggingarráðið samsvarandi § 29 hevur viðurkent ein fráboðaðan tilburð sum arbeiðsskaða, kann ráðið tó ikki uttan í heilt serligum førum játta tryggjaða veitingar sambært lógini – tó burtursæð frá dagpeningi, sbr. 10. kapitli – fyrr enn kærufreistin í § 36, stk. 1 er runnin.

*Uppafturtøka av málinum*

**§ 31.** Hevur Vanlukkutryggingarráðið samsvarandi § 29 boðað frá, at ein fráboðaður tilburður ikki kann viðurkennast sum arbeiðsskaði, kann málið verða tikið upp til nýggja viðgerð innan 5 ár eftir hesa fráboðan.

*Stk. 2.* Hevur Vanlukkutryggingarráðið samsvarandi stk. 1 víst frá sær ein fráboðaðan sjúkutilburð sum arbeiðsskaða, og hesin sjúkutilburður seinni verður tikin við í kunngerðini um vinnusjúkur, sbr. § 10, stk. 1, nr. 1, kann málið takast upp til nýggja viðgerð, eisini eftir at 5 ára freistin er runnin.

**§ 32.** Hevur Vanlukkutryggingarráðið boðað tryggjaða frá, at ein fráboðaður tilburður – hóast viðurkendur sum arbeiðsskaði - ikki hevur havt avleiðingar, sum geva rætt til veitingar sambært lógini, kunnu krøv hesum viðvíkjandi ikki verða sett fram seinni enn 5 ár eftir hesa fráboðan.

*Stk. 2.* Tá heilt serligar umstøður tala fyri tí, kann Vanlukkutryggingarráðið síggja burtur frá 5 ára freistini í stk. 1.

*Missur av rættindum hins tryggjaða*

**§ 33.** Ger tryggjaði ikki eftir boðum givnar sambært § 28, stk. 3, ella forðar hann í aðrar mátar fyri heilsubata av skaðanum ella sjúkuni, kann Vanlukkutryggingarráðið avgera, at tryggjaði heilt ella partvíst missir rættin til veitingar sambært lógini.

*Stk. 2.* Á sama hátt kunnu tey avvarðandi hjá einum, ið hevur latið lív orsakað av arbeiðsskaða, missa rættin til veitingar sambært hesi lóg, um tey sýta fyri einum sambært hesi lóg kravdum líkuppskurði.

**§ 34.** Fær Vanlukkutryggingarráðið orsakað av viðurskiftum hins tryggjaða ella hansara avvarðandi ikki tikið støðu til, um ein fráboðaður tilburður kann viðurkennast sum ein arbeiðsskaði, fellur kravið um málsviðgerð burtur, tá 5 ár eru liðin, síðani tilburðurin av fyrsta sinni varð fráboðaður ráðnum.

## Kapittul 7
## Kæra

*Ankestyrelsen*

**§ 35.** Avgerðir, sum Vanlukkutryggingarráðið tekur sambært hesi lóg, kunnu av tryggjaða – herundir eisini tí sjálvstøðugt vinnurekandi – hansara avvarðandi, viðkomandi arbeiðsgevara, ella viðkomandi tryggingarfelag kærast til Ankestyrelsen, tó ikki avgerðir, tiknar sambært § 26, stk. 2. Arbeiðsgevarin kann bert kæra avgerðir, tiknar sambært § 29.

*Stk. 2.* Avgerðir, sum Ankestyrelsen tekur sambært hesi lóg, kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarmyndugleika.

*Stk. 3.* Umsitingarútreiðslurnar, sum Ankestyrelsen hevur av kæruviðgerð sambært hesi lóg, verða rindaðar av landskassanum.

*Kærufreistir*

**§ 36.** Kærufreistin er 8 vikur frá tí degi, kærarin fekk fráboðan um avgerðina hjá Vanlukkutryggingarráðnum.

*Stk. 2.* Um serligar umstøður tala fyri tí, kann Ankestyrelsen síggja burtur frá kærufreistunum í stk. 1.

*Stk. 3.* Kæra er bert steðgandi, um kærarin er arbeiðsgevari ella tryggingarfelag.

*Kæruviðgerðin*

**§ 37.** Myndugleikar, stovnar, arbeiðsgevarar, tryggjaði umframt onnur hava eftir áheitan skyldu til at lata Ankestyrelsen allar tær upplýsingar, sum Ankestyrelsen heldur vera av týdningi fyri kæruviðgerðina. Somuleiðis kann Ankestyrelsen senda sakkøn fólk at gera kanningar á arbeiðsplássum o.ø.

*Stk. 2.* Tryggjaði hevur skyldu til at gera eftir teimum boðum, sum Ankestyrelsen heldur vera av týdningi fyri kæruviðgerðina, herundir lata seg kanna av lækna, ávístur av Ankestyrelsen, lata seg innleggja á sjúkrahús og líknandi til nærri kanningar, at lata seg arbeiðsroyna og at geva Ankestyrelsen nærri frágreiðing í málinum.
*Stk. 3.* Útreiðslurnar, ið standast av ásetingunum í stk. 1 og 2, herímillum útreiðslur til læknaváttanir, umframt ferðaútreiðslur, ið standast av, at tryggjaði fylgir boðum, givin sambært stk. 2, verða rindaðar av tryggingarfelagnum ella landinum, sbr. § 21, stk. 4. Eisini rindar tryggingarfelagið ella landið, sbr. § 21, stk. 4, endurgjald fyri próvførda mista arbeiðs-inntøku yvir 2 tímar í sambandi við, at tryggjaði lýkur sínar skyldur eftir stk. 2; sum grundarlag fyri hesum endurgjaldi verður árslønin, sbr. § 42, nýtt. Ásetingarnar í §§ 21 og 22 verða nýttar samsvarandi.

## PARTUR III
## Veitingarnar

### Kapittul 8

*Um veitingarnar*

**§ 38.** Veitingarnar sambært hesi lóg eru:
1. Útreiðslur til hjálpitól, sjúkuviðgerð v.m. undir málsviðgerðini, sbr. 9. kapittul,
2. Dagpeningur undir málsviðgerðini, sbr. 10. kapittul,
3. Endurgjald fyri mist arbeiðsføri, sbr. 11. kapittul,
4. Samsýning fyri varandi mein, sbr. 12. kapittul,
5. Skiftisveiting til eftirsitandi hjúnafelaga ella onnur, sbr. 13. kapittul og
6. Endurgjald til vaksin og børn fyri miss av uppihaldara, sbr. 14. kapittul.

**§ 39.** Veitingarnar til tryggjaða sambært 9., 10., 11. og 12. kapitli verða ásettar í mun til avleiðingarnar av arbeiðsskaðanum og kunnu tí lækka ella, eftir umstøðunum, heilt detta burtur, um núverandi heilsuliga og sosiala støðan ikki einans er elvd av arbeiðsskaðanum.
*Stk. 2.* Verður mist arbeiðsføri ella varandi mein staðfest, ella letur persónur lív, verður hetta roknað sum avleiðing av arbeiðsskaða sambært hesi lóg, uttan so, at mestu sannlíkindini tala ímóti hesum.
*Stk. 3.* Tann, ið hevur fingið staðfest eina sjúku, sum er nevnd í kunngerðini um vinnusjúkur, sbr. § 10, stk. 1, nr. 1, hevur krav um tær í lógini ásettu veitingarnar, tó ikki, um tað verður hildið mest sannlíkt, at sjúkan er elvd av øðrum orsøkum enn arbeiði hins sjúka.

**§ 40.** Hevur tryggjaði við vilja ella við ólógligari gerð ella undanláti elvt til ella í stóran mun verið við at elvt til tryggingartilburðin, kann Vanlukkutryggingarráðið avgera, at rættur hins tryggjaða til endurgjald fyri mist arbeiðsføri, ella samsýningin fyri varandi mein lækkar ella heilt dettur burtur.
*Stk. 2.* Tryggjaði skal nágreiniliga kunnast um avgerðir, tiknar eftir stk. 1.

*Ræðisrættur og renting*

**§ 41.** Veitingar sambært hesi lóg verða goldnar tí persóni, ið hevur rætt til veitingina.
*Stk. 2.* Metir Vanlukkutryggingarráðið, at viðkomandi ikki eigur at hava ræðisrætt á veitingini, avger ráðið, á hvønn hátt upphæddin skal koma viðkomandi til góðar.
*Stk. 3.* Verða játtaðar veitingar, nevndar í stk. 1, goldnar, eftir at kærufreistin sambært § 36 er runnin, verður renta, ið er 1% yvir diskonto Tjóðbankans, latin frá hesum tíðarskeiði, og til goldið verður. Í teimum í § 75 nevndu førum er freistin 14 dagar frá tí degi, Almannastovan endaliga gav tí, sum skal gjalda endurgjaldið, fráboðan um aftursóknarkravið.

*Árslønin*

**§ 42.** Veitingarnar sambært 11. og 14. kapitli verða ásettar við grundarlagi í árslønin hins tryggjaða.

*Stk. 2.* Árslønin hjá løntakarum er samlaða arbeiðsinntøkan árið frammanundan arbeiðsskaðan, sí tó stk. 3-5. Í árslønina skal íroknast virðið av fríum kosti og uppihaldi, umframt virðið av øðrum vøruveitingum, samsvarandi nærri reglum, ásettar av landsstýrismanninum.
*Stk. 3.* Árslønin hjá sjálvstøðugt vinnurekandi er seinasta álíknaða inntøkuárið.
*Stk. 4.* Vanlukkutryggingarráðið ásetir tó árslønina eftir meting, um:

1. tryggjaði arbeiðir undir serligum setanarviðurskiftum,
2. tryggjaði vegna vinnusjúku ikki hevur verið í arbeiði fyri somu løn í øllum tí undanfarna árinum,
3. tryggjaði frammanundan arbeiðsskaðan ikki hevur verið á arbeiðsmarknaðinum í styttri ella longri tíðarskeiði ella
4. árslønin roknað sambært stk. 2 ella 3 ikki gevur eina rættvísa mynd av vanligu ársløn hins tryggjaða.

*Stk. 5*. Er tryggjaði yngri enn 21 ár ella undir útbúgving, tá arbeiðsskaðin hendir, kann hædd takast fyri tí arbeiðsinntøku, sum tryggjaði væntandi hevði forvunnið, eftir at hann var fyltur 21 ár, ella eftir at útbúgvingin varð liðug, um arbeiðsskaðin ikki var hendur.
*Stk. 6.* Árslønin kann í mesta lagi verða ásett til 350.000 krónur, javnað sambært § 43.

*Javning av upphæddunum*

**§ 43.** Tær í § 42, stk. 6, § 57, stk. 2 og § 59, stk. 1 nevndu upphæddir verða javnaðar av landsstyrinum eftir tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag og avrundaðar til nærmastu 100 kr.
*Stk. 2.* Vanlukkutryggingarráðið skal innan 1. januar, eftir at sáttmálin, nevndur í stk. 1, er broyttur, almannakunngera tær soleiðis javnaðu upphæddirnar.
*Stk. 3.* Veitingarnar sambært lógini verða roknaðar við grundarlagi í upphæddunum, ið vóru galdandi, tá avgerðin um játtaðu veitingarnar verður tikin.

## Kapittul 9
## Sjúkuviðgerð, uppvenjing og hjálpitól v.m. undir málsviðgerðini

**§ 44.** Er undir málsviðgerðini neyðugt við sjúkuviðgerð ella uppvenjing til tess at fáa best møguligan heilsubata, rindar tryggingarfelagið ella landið, sbr. § 21, stk. 4, útreiðslurnar í tann mun, tað ikki áliggur tí føroyska heilsuverkinum, sjúkrakassanum o.ø, at rinda hesar útreiðslur. Uppvenjing skal undir læknaligum eftirliti fremjast sum beinleiðis framhald av sjúkuviðgerðini. Tryggingarfelagið ella landið, sbr. § 21, stk. 4, rindar allar útreiðslurnar til protesur, brillur og líknandi hjálpitól, sum eru neyðug til tess at tryggja útlitini fyri sjúkuviðgerðini ella uppvenjingini, minkað um avleiðingarnar av arbeiðsskaðanum, ella gjølligari at kunna áseta varandi meinið ella missin av arbeiðsførinum. Ásetingarnar í §§ 21 og 22 verða nýttar samsvarandi.
*Stk. 2.* Nýtti tryggjaði longu frammanundan eitthvørt hjálpiamboð, nevnt í stk. 1, í sambandi við arbeiðið, og er hetta hjálpitól vorðið skatt í sambandi við arbeiðsskaðan, rindar tryggingarfelagið ella landið, sbr. § 21, stk. 4, kostnaðin av at umvæla ella endurnýggja hjálpiamboðið. Ásetingarnar í §§ 21 og 22 verða nýttar samsvarandi.
*Stk. 3.* Ásetingarnar í stk. 1 verða nýttar samsvarandi, tá spurningurin um mist arbeiðsføri, sbr. § 53, og varandi mein, sbr. § 58, verður tikin upp til nýggja viðgerð.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um fulnaðin av útreiðslunum sambært stk. 1 og 2, herímillum reglur um, at nevndu útreiðslur undir serligum umstøðum kunnu rindast, sjálvt um málið ikki er til viðgerðar.

*Uppafturtøka av málinum*

**§ 45.** Spurningurin um útreiðslurnar, nevndar í § 44, stk. 1 og 2, kann eftir áheitan frá tryggjaða ella av Vanlukkutryggingarráðnum sjálvum verða tikin upp til nýggja viðgerð innan 5 ár eftir fyrstu avgerðina, treytað av, at munandi broytingar eru hendar í teimum viðurskiftum, ið vóru grundarlagið undir avgerðini.
*Stk. 2.* Freistin fyri uppafturtøku kann verða longd, áðrenn 5 ára freistin í stk. 1 er runnin.

Tá heilt serligar umstøður tala fyri tí, kann Vanlukkutryggingarráðið heilt síggja burtur frá 5 ára freistini.

## Kapittul 10
## Dagpeningur vegna sjúku aftaná arbeiðsskaða

**§ 46.** Dagpeningur vegna sjúku aftaná arbeiðsskaða verður umsitin og útgoldin av Almannastovuni, sambært vanligu reglunum í dagpeningalógini.
*Stk. 2.* Verður ein sjúku- ella skaðatilburður, sum er fráboðaður Almannastovuni sambært dagpeningalógini ella Lønjavningargrunninum sambært løgtingslógini um sjúkratrygd fiskimanna, seinni viðurkendur sum arbeiðsskaði sambært hesi lóg, verður útgjaldingin av dagpeningaveitingini endurgoldin av tryggingarfelagnum ella landinum sbr. § 16, stk. 2 fyri alt sjúkutíðarskeiðið, har tilburðurin er tryggjaður. § 21, stk. 4 verður nýtt samsvarandi.

## Kapittul 11
## Endurgjald fyri mist arbeiðsføri

*Mist arbeiðsføri*
**§ 47.** Hevur arbeiðsskaðin havt við sær minkandi førleika hjá tryggjaða at forvinna sær inntøku við arbeiði, hevur viðkomandi rætt til endurgjald fyri mist arbeiðsføri. Endurgjald verður tó ikki veitt, um óarbeiðsføri verður ásett til minni enn 15%.
*Stk. 2.* Tá mett verður um miss av arbeiðsføri, skal hædd takast fyri, um tryggjaði hevur møguleika at útvega sær inntøku við tílíkum arbeiði, ið rímiligt er at krevja av honum eftir førimuni, útbúgving, aldri og møguleikunum fyri vinnuligari endurútbúgving og uppvenjing.

*Avgerðarfreistir*
**§ 48.** Tá ið tað eftir sjúkuviðgerð, uppvenjing v.m. er grundarlag fyri at meta um framtíðar heilsustøðu og arbeiðsmøguleikar hins tryggjaða, avger Vanlukkutryggingarráðið, um tryggjaði hevur rætt til endurgjald fyri mist arbeiðsføri.
*Stk. 2.* Avgerðin eftir stk. 1 skal um møguligt takast innan 1 ár og í seinasta lagi 2 ár eftir fráboðanina um arbeiðsskaðan.
*Stk. 3.* Forskot upp á endurgjald fyri mist arbeiðsføri kann veitast tryggjaða, til endalig avgerð er tikin sambært stk. 2.
*Stk. 4.* Er greiða ikki fingin á arbeiðsviðurskiftum hins tryggjaða innan 2 ára freistina í stk. 2, skal Vanlukkutryggingarráðið játta tryggjaða eitt fyribils endurgjald fyri mist arbeiðsføri.
*Stk. 5.* Endurgjald fyri miss av arbeiðsføri til barn við fosturskaða, sbr. § 10, stk. 1, nr. 2, ella til barn við sjúku, elvda av árinum á foreldrini áðrenn gitingina ella eftir føðingina, sbr. § 10, stk. 2, kann í fyrsta lagi verða veitt barninum frá 15. árinum.

*Upphædd og útgjaldingin*
**§ 49.** Hevur tryggjaði mist alt arbeiðsførið, verður veitt eitt endurgjald, ið svarar til 80% av ársløn hansara, roknað sambært § 42. Hevur tryggjaði partvíst mist arbeiðsførið, verður endurgjaldið lækkað lutfalsliga.

**§ 50.** Endurgjald fyri mist arbeiðsføri verður veitt sum framhaldandi árlig veiting, uttan so, at veitingin verður roknað um til eina ávísa peningaupphædd sambært § 51.
*Stk. 2.* Tann árliga veitingin verður goldin tryggjaða mánaðarliga frammanundan, og útgjaldingin byrjar, tá avgerðin er tikin, uttan so, at serligar umstøður tala fyri einum øðrum byrjanartíðarskeiði.
*Stk. 3.* Framhaldandi endurgjaldsveitingin heldur uppat seinast í mánaðinum, tá tryggjaði fyllir 67 ár, og tryggjaði fær tá í staðin eitt endaligt endurgjald fyri mist arbeiðsføri, ið svarar til 2 ferðir ta árligu endurgjaldsveitingina eftir § 49. Er tryggjaði longu fyltur 67 ár, tá avgerðin um at veita honum endurgjald fyri mist arbeiðsføri verður tikin, verður endaliga veitingin somuleiðis 2 ferðir árliga gjaldið, roknað sambært § 49.

*Umrokning til eina ávísa peningaupphædd*
**§ 51.** Er óarbeiðsførið ásett til 50% ella lægri, verður tann framhaldandi árliga

endurgjaldsveitingin roknað um til eina ávísa peningaupphædd. Er óarbeiðsførið ásett til 51% ella hægri, kann endurgjaldsveitingin undir serligum umstøðum og eftir áheitan frá tí, ið hevur rætt til upphæddina, roknast um til eina ávísa peningaupphædd. Fyribils endurgjald eftir § 48, stk. 4 kann tó í ongum førum roknast um til peningaupphædd.
*Stk. 2.* Umrokningin av framhaldandi árligum veitingum til peningaupphædd verður framd við grundarlagi í støddini á veitingini á umrokningardegnum samsvarandi nærri reglum, ásettar av landsstýrismanninum eftir tilráðing frá Vanlukkutryggingarráðnum.
*Stk. 3.* Tá endalig avgerð er tikin um endurgjald fyri mist arbeiðsføri, og tann, ið hevur rætt til endurgjaldið, hevur biðið um at fáa endurgjaldið umroknað til eina ávísa peningaupphædd, verður peningaupphæddin goldin til búgvið, um viðkomandi doyr, áðrenn veitingin verður goldin honum. Umrokningin verður framd við grundarlagi í støddini av upphæddini á andlátsdegnum.

*Mótrokning í øðrum veitingum*

**§ 52.** Hevur tryggjaði orsakað av arbeiðsskaðanum rætt til eftirløn sambært lógini um tænastumannaeftirløn, lækkar endurgjaldið fyri mist arbeiðsføri sambært hesi lóg við 2/3 av teirri upphædd, ið tænastumannaeftirlønin orsakað av arbeiðsskaðanum er hækkað upp um ta eftirløn, ið viðkomandi um hetta mundið sambært starvsaldri sínum annars hevði havt rætt til.
*Stk. 2.* Ásetingarnar í stk. 1 eru eisini galdandi fyri onnur tryggjað sambært hesi lóg, sum hava eftirlønarrættindi eftir samsvarandi reglum, sum lógin um tænastumannaeftirløn ásetir. Í hesum førunum rindar viðkomandi tryggingarfelag ella landið, sbr. § 21, stk. 4, tí, sum er skyldugur at rinda eftirlønina, eina upphædd, ið svarar til ta minking, ið er hend veitingunum sambært hesi lóg.

*Uppafturtøka av málinum*

**§ 53.** Spurningurin um endurgjald fyri mist arbeiðsføri kann eftir áheitan frá tryggjaða ella av Vanlukkutryggingarráðnum sjálvum verða tikin upp til nýggja viðgerð innan 5 ár eftir fyrstu avgerðina, treytað av, at munandi broytingar eru hendar í teimum viðurskiftum, ið vóru grundarlagið undir avgerðini.
*Stk. 2.* Freistin fyri uppafturtøku kann verða longd, áðrenn 5 ára freistin í stk. 1 er runnin. Tá heilt serligar umstøður tala fyri tí, kann Vanlukkutryggingarráðið heilt síggja burtur frá 5 ára freistini.

*Upplýsingarskylda hins tryggjaða*

**§ 54.** Tann, ið fær framhaldandi árliga veiting fyri mist arbeiðsføri, hevur skyldu til at boða Vanlukkutryggingarráðnum frá broytingum í viðurskiftum sínum.
*Stk. 2.* Á sama hátt hava Vanlukku-tryggingarráðið og tryggingarfelagið ella landið, sbr. § 16, stk. 2, skyldu til at geva tí gætur, um viðurskifti hins tryggjaða broytast, sum ásett í stk. 1.
*Stk. 3.* Hevur tryggjaði ikki boðað frá viðkomandi broytingum, nevndar í stk. 1, kann Vanlukkutryggingarráðið áleggja honum - ella deyðsbúgvi hansara - at endurrinda tryggingarfelagnum ella landinum, sbr. § 16, stk. 2, ta upphædd, ið hann soleiðis av órøttum hevur móttikið. Skyldugar upphæddir kunnu mótroknast í framhaldandi veitingum sambært hesi lóg, tó undantikið veitingunum sambært 13. og 14. kapitli. Ásetingarnar í §§ 21 og 22 verða nýttar samsvarandi.

## Kapittul 12
## Samsýning fyri varandi mein

*Varandi mein*

**§ 55.** Hevur tryggjaði fingið varandi mein av arbeiðsskaðanum, verður veitt ein samsýning, um meinstigið er 5% ella hægri.
*Stk. 2.* Meinstigið verður ásett við grundar-lagi í læknafrøðiligari meting um slagið og støddina av arbeiðsskaðanum og við atliti til, hvussu hesi hava ávirkað persónligu tilveru hins tryggjaða.

*Avgerðarfreistir*

**§ 56.** Tá ið tað eftir sjúkuviðgerð, uppvenjing v.m. er grundarlag fyri at meta um framtíðar heilsustøðu hins tryggjaða, avger Vanlukkutryggingarráðið, um tryggjaði hevur rætt til samsýning fyri varandi mein.
*Stk. 2.* Avgerðin eftir stk. 1 skal um møguligt takast innan 1 ár og í seinasta lagi 2 ár eftir fráboðanina um arbeiðsskaðan.
*Stk. 3.* Forskot upp á samsýning fyri varandi mein kann veitast tryggjaða, til endalig avgerð er tikin samsvarandi stk. 1 og 2.

*Upphædd og útgjalding*

**§ 57.** Samsýning fyri varandi mein verður ásett til eina ávísa peningaupphædd og útgoldin í einum.
*Stk. 2.* Er meinstigið 100%, verður samsýningin 400.000 krónur, javnað sambært § 43. Er meinstigið lægri enn 100%, verður samsýningin lutfalsligi parturin av 400.000 krónum. Í heilt serligum førum kann samsýningin ásetast hægri, tó í mesta lagi til 120% av 400.000 krónum, svarandi til 480.000 krónur.
*Stk. 3.* Var tryggjaði fyltur 60 ár, tá arbeiðsskaðin hendi, verður samsýningin fyri varandi mein lækkað við 5% fyri hvørt árið, tryggjaði var eldri enn 59 ár, tá arbeiðsskaðin hendi, tó ikki eftir at tryggjaði hevur fylt 69 ár.

*Uppafturtøka av endurgjaldsspurninginum*

**§ 58.** Spurningurin um samsýning fyri varandi mein kann eftir áheitan frá tryggjaða ella av Vanlukkutryggingarráðnum sjálvum verða tikin upp til nýggja viðgerð innan 5 ár eftir fyrstu avgerðina, treytað av, at munandi broytingar eru hendar í teimum viðurskiftum, ið vóru grundarlagið undir avgerðini.
*Stk. 2.* Freistin fyri uppafturtøku kann verða longd, áðrenn 5 ára freistin í stk. 1 er runnin. Tá heilt serligar umstøður tala fyri tí, kann Vanlukkutryggingarráðið heilt síggja burtur frá 5 ára freistini.

## Kapittul 13
## Skiftisveiting til eftirsitandi

*Hjúnafelagar*

**§ 59.** Letur tryggjaði lív orsakað av arbeiðsskaðanum, fær eftirsitandi hjúnafelagi hins deyða eina skiftisveiting upp á 150.000 krónur treytað av, at hjúnabandið var komið í lag, áðrenn arbeiðsskaðin hendi, og at hjúnafelagarnir framvegis livdu saman, tá andlátið hendi. Skiftisveitingin verður javnað sambært § 43.
*Stk. 2.* Er hjúnabandið komið í lag, eftir at arbeiðsskaðin hendi, hevur eftirsitandi hjúnafelagin rætt til somu skiftisveiting, sum nevnd í stk. 1, treytað av, at hjúnabandið hevur varað 2 tey seinastu árini, áðrenn tryggjaði læt lív av arbeiðsskaðanum, og hjúnafelagarnir framvegis livdu saman, tá andlátið hendi.

*Ógift*

**§ 60.** Rætt til somu skiftisveiting, sum ásett í § 59, stk. 1, hevur eisini eftirsitandi persónur, sum frammanundan arbeiðsskaðanum livdi saman við tí deyða undir hjúnabandslíknandi viðurskiftum, treytað av, at samlívið teirra millum uttan slit hevur varað 2 tey seinastu árini áðrenn andlátið.

*Onnur eftirsitandi*

**§ 61.** Er eingin eftirsitandi, sum hevur rætt til skiftisveiting, samsvarandi § 59 ella § 60, kann skiftisveiting undir serligum umstøðum verða latin øðrum persóni, sum stóð hinum deyða nær.

*Freistir*

**§ 62.** Tá andlát er fráboðað Vanlukku-tryggingarráðnum, skal avgerð um skiftisveiting samsvarandi §§ 59-61 um møguligt verða tikin innan 1 ár og í seinasta lagi 2 ár eftir fráboðanina.

## Kapittul 14
## Endurgjald fyri miss av uppihaldara

*Endurgjald til vaksin*

**§ 63.** Tann, ið sambært § 59 ella § 60 hevur rætt til skiftisveiting, og sum við deyða hins tryggjaða hevur mist uppihaldara, ella á annan hátt verður fyri versnaðum

uppihaldsviðurskiftum orsakað av andlátinum, hevur rætt til endurgjald fyri miss av uppihaldara.

**§ 64.** Endurgjaldið fyri miss av uppihaldara er ein framhaldandi tíðaravmarkað veiting, sum árliga svarar til 30% av ársløn hins deyða, roknað sambært § 42, og sum í mesta lagi kann verða veitt í 10 ár, sí tó § 66.
*Stk. 2.* Árliga endurgjaldið sambært stk. 1 verður veitt frá deyðadegnum og goldið mánaðarliga frammanundan. Framhaldandi árliga veitingin kann eftir áheitan frá tí, sum hevur rætt til veitingina, roknast um til eina ávísa peningaupphædd, samsvarandi ásetingunum í § 51, stk. 2.
*Stk. 3.* Fær viðkomandi eftirsitiløn orsakað av andlátinum, byrjar útgjaldingin av endurgjaldinum fyri miss av uppihaldara ikki, fyrr enn eftirsitilønartíðarskeiðið er runnið.
*Stk. 4.* Fekk tann deyði framhaldandi veiting fyri miss av arbeiðsføri, sbr. § 50, kemur endurgjaldið fyri miss av uppihaldara ikki til útgjaldingar fyrr enn tann 1. í mánaðinum eftir andlátið.
*Stk. 5.* Upphæddin sambært stk. 1 er óbroytt í ásetta tíðarskeiðinum, uttan so at móttakarin biður um at fáa upphæddina roknaða um til eina ávísa peningaupphædd, sbr. stk. 2, ella móttakarin av veitingini doyr.

**§ 65.** Tann, ið fær framhaldandi endurgjald fyri miss av uppihaldara, sbr. § 64, kann innan 5 ár eftir avgerðina biðja Vanlukkutryggingarráðið um at fáa veitingartíðarskeiðið longt, tó ikki longri enn í samanlagt 10 ár.

**§ 66.** Endurgjaldið fyri miss av uppihaldara heldur uppat seinast í tí mánaðinum, at tann, ið hevur rætt til veitingina, fyllir 67 ár, og veitt verður tá eitt endaligt endurgjald, ið svarar til 2 ferðir tað árliga endurgjaldið sambært § 64, stk. 1. Sama er galdandi, um viðkomandi longu er fyltur 67 ár, tá tryggjaði læt lív orsakað av arbeiðsskaðanum.

*Endurgjald til børn*

**§ 67.** Doyr annað av foreldrunum hjá børnum, ið viðkomandi sambært lóg hevði uppihaldsskyldu móti, orsakað av arbeiðsskaða, men er hitt av foreldrunum á lívi, fær hvørt barnið, til tað fyllir 18 ár, eina framhaldandi árliga veiting, ið svarar til 10% av ársløn hins deyða, roknað sambært § 42. Var hin deyði einsamallur uppihaldari, er endurgjaldið tó 20% av ársløn hins deyða.
*Stk. 2.* Eitt barn, sum fær endurgjald eftir stk. 1, og sum seinni missir hitt av foreldrunum, men ikki orsakað av arbeiðsskaða, fær í restini av veitingartíðarskeiðinum, sbr. stk. 1, eina framhaldandi árliga veiting, ið svarar til 20% av árslønini hjá tí fyrr deyða av foreldrunum. Um hitt seinni deyða av foreldrunum eisini doyr orsakað av arbeiðsskaða, er endurgjaldið í restini av veitingartíðarskeiðinum 20% av samlaðu ársinntøku foreldranna.
*Stk. 3.* Missir eitt barn bæði foreldrini samstundis, harav annað teirra letur lív orsakað av arbeiðsskaða, verður endurgjaldið sambært stk. 1 ásett til 20% av ársinntøku hjá tí av foreldrunum, ið doyði orsakað av arbeiðsskaðanum. Doyggja bæði foreldrini samstundis orsakað av arbeiðsskaða, er endurgjaldið tó 20% av samlaðu ársinntøku foreldranna.
*Stk. 4.* Er barnið undir útbúgving, tá ið tað fyllir 18 ár, og umstøðurnar annars tala fyri tí, kann veitingartíðarskeiðið leingjast, til útbúgvingin eigur at vera liðug, tó í longsta lagi til viðkomandi er fyltur 21 ár. Sama er galdandi, um viðkomandi longu frammanundan deyða foreldranna var fyltur 18 ár og undir útbúgving.

**§ 68.** Veitingar sambært § 67 verða veittar frá deyðadegnum og rindaðar mánaðarliga frammanundan.
*Stk. 2.* Kemur eftirsitiløn til útgjaldingar vegna andlátið, byrjar útgjaldingin av endurgjaldinum tó ikki, fyrr enn eftirsitilønartíðarskeiðið er runnið.

**§ 69.** Eru veitingarnar roknaðar eftir § 67 hægri enn 60% av ávíkavist ársløn hins deyða, ella samlaðu ársløn foreldranna, roknað sambært § 42, verða einstøku

veitingarnar lækkaðar til samanlagt 60% av árslønini.
*Stk. 2.* Verður samstundis veitt endurgjald eftir § 63, lækka einstøku veitingarnar til børnini til samanlagt 50% av ársløn hins deyða.

*Endurgjald til onnur eftirsitandi*

**§ 70.** Eru samlaðu árligu veitingarnar til vaksin og børn sambært hesum kapitli lægri enn 70% av ársløn hins deyða, roknað sambært § 42, kann endurgjald innan hesar karmar undir serligum umstøðum verða veitt øðrum persónum enn omanfyri nevndu, treytað av, at tann deyði heilt ella partvíst uppihelt teimum um tað mundið, arbeiðsskaðin hendi.
*Stk. 2.* Endurgjaldið eftir stk. 1, burtursæð frá endurgjaldinum til stjúkbørn undir 21 ár, kann eftir áheitan roknast um til eina ávísa peningaupphædd samsvarandi ásetingunum í § 51, stk. 2.

*Avgerðarfreistir*

**§ 71.** Tá andlát er fráboðað Vanlukku-tryggingarráðnum, skal avgerð um endurgjald fyri miss av uppihaldara, sbr. §§ 63, 67 og 70, um møguligt verða tikin innan 1 ár og í seinasta lagi 2 ár eftir fráboðanina.

*Mótrokning í øðrum veitingum*

**§ 72.** Hava avvarðandi hins deyða vegna arbeiðsskaðan rætt til eftirløn sambært lógini um tænastumannaeftirløn, lækkar endurgjaldið fyri miss av uppihaldara sambært hesi lóg við 2/3 av teirri upphædd, ið tænastumannaeftirlønin er hækkað upp um ta eftirløn, sum á andlátsdegnum svarar til tænastualdur hins deyða.
*Stk. 2.* Ásetingarnar í stk. 1 eru eisini galdandi fyri onnur tryggjað sambært hesi lóg, sum hava rættindi eftir samsvarandi reglum, sum lógin um tænastumannaeftirløn ásetir. Í hesum førunum rindar viðkomandi tryggingarfelag ella landið, sbr. § 21, stk. 4, tí, sum er skyldugur at rinda eftirlønina, eina upphædd, ið svarar til ta minking, ið er hend veitingunum sambært hesi lóg.

## PARTUR IV

## Almennar reglur

## Kapittul 15
## Aftursóknarkrøv, vangilding og revsing v.m.

*Aftursóknarkrøv*

**§ 73.** Veitingar, latnar sambært hesi lóg, kunnu ikki vera grundarlag fyri aftursóknarkravi frá arbeiðsskaðatryg-gingarfelag móti skaðaelvara, sum er endurgjaldsskyldugur móti tí, sum hevur verið fyri arbeiðsskaða, ella hansara avvarðandi.
*Stk. 2.* Endurgjaldskravið frá tryggjaða ella hansara avvarðandi móti skaðaelvaranum í sambandi við arbeiðsskaðan lækkar samsvarandi teirri upphædd, sum er ella skal verða goldin tryggjaða sambært hesi lóg.

**§ 74.** Hevur skaðaelvari, tryggingarfelag ella landið, sbr. § 21, stk. 4, goldið tryggjaða ella avvarðandi hansara endurgjald fyri arbeiðsskaðan, hevur skaðaelvarin, tryggingarfelagið ella landið, sbr. § 21, stk. 4, aftursóknarkrav móti viðkomandi arbeiðsskaðatryggingarfelag.
*Stk. 2.* Aftursóknarkravið er tann upphædd, sum viðkomandi arbeiðsskaðatryggingar-felag sambært hesi lóg hevur skyldu til at rinda tryggjaða um tað mundið, aftursóknarkravið verður sett fram.

**§ 75.** Hevur tryggjaði ella avvarðandi hansara fingið útgoldið almannaveitingar sambært almannalóggávuni fyri eitt tíðarskeið, ið tað seinni verður játtað framhaldandi endurgjald fyri miss av arbeiðsføri sambært 11. kapitli, ella endurgjald fyri miss av uppihaldara sambært 14. kapitli, hevur Almannastovan eitt aftursóknarkrav móti viðkomandi tryggingarfelag ella landinum, sbr. § 21, stk. 4. Ásetingarnar í §§ 21 og 22 verða nýttar samsvarandi.
*Stk. 2.* Aftursóknarkravið er munurin millum ta upphædd, ið er goldin sambært stk. 1, og ta upphædd, ið hevði verið goldin sambært hesi lóg, um upphæddin varð útgoldin samstundis sum almannaveitingarnar. Aftursóknarkravið kann tó ikki vera hægri

enn tann upphædd, ið fyri sama tíðarskeið er játtað eftir hesi lóg.

*Ógildugar avtalur*

**§ 76.** Avtalur millum tey sambært hesi lóg tryggingarskyldugu og tryggjaðu eru ógildugar, um avtalan miðar ímóti ella hevur við sær:

1. at ásetingarnar í hesi lóg ikki skulu vera galdandi millum partarnar,
2. at tryggjaði skal rinda tryggingargjøld til tryggingarfelag, ið tað sambært hesi lóg áliggur tí tryggingarskylduga arbeiðsgevar-anum at rinda,
3. at veitingar í sambandi við arbeiðsskaðar skulu roknast á øðrvísi hátt, enn ásett í hesi lóg, ella
4. at kostnaðurin av trygging arbeiðsgevarans skal afturhaldast í løn hins tryggjaða.

**§ 77.** Krøv, heimilað í hesi lóg, kunnu ikki verða fyri lóghaldi, fíggjartøku ella aðrari rættarsókn. Rættargerðir, ið tryggjaði ella avvarðandi hansara fremja viðvíkjandi hesum krøvum, eru ógildugar.

*Sektarásetingar*

**§ 78.** Við sekt kann tann arbeiðsgevari ella sjálvstøðugt vinnurekandi revsast:

1. sum ikki teknar tær í hesi lóg kravdu arbeiðsskaðatryggingar, sbr. § 11, stk. 1 og § 12,
2. sum ikki varðveitir teknaðar tryggingar í gildi, sbr. § 11, stk. 1 og § 12,
3. sum ikki rættstundis fráboðar arbeiðsskaðar, sbr. § 24, stk. 1 og 3, ella
4. sum ikki lýkur skyldur sínar annars sbr. § 14, § 21, § 22 og § 46, stk. 2.

*Stk. 2.* Er brotið framt av løgfrøðiligum persóni, sum t.d. partafelagi ella lutafelagi, kann tann løgfrøðiligi persónurin verða sektaður sum slíkur. Er brotið framt av landinum, einari kommunu ella kommununalum felagsskapi, sbr. § 51 í kommunustýrislógini, kunnu landið, kommunan ella kommunali felagsskapurin verða sektað.

*Stk. 3.* Í forskriftum, givnar við heimild í lógini, sbr. § 7 og § 25, stk. 2, kunnu ásetast reglur um revsing við bót fyri brot á ásetingarnar í forskriftunum.

## Kapittul 16
## Gildiskomu- og skiftisreglur

**§ 79.** Hendas løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2007.

*Stk. 2.* Løgtingslógin fevnir um:

1. Teir í lógini nevndu tilburðir, ið henda gildiskomudagin ella seinni.
2. Vinnusjúkur, sbr. § 8, nr. 4, sum verða fráboðaðar Vanlukkutryggingarráðnum gildiskomudagin ella seinni.

*Stk. 3.* Samstundis, sum henda løgtingslógin kemur í gildi, fer úr gildi “Kongelig anordning nr. 389 af 15. november 1966 om forsikring mod følger af ulykkestilfælde”. Tó verða tilburðir, sum samsvarandi ásetingunum í kongligu fyriskipanini um vanlukkutrygging longu eru hendir ella fráboðaðir innan gildiskomudagin sambært stk. 1, framvegis viðgjørdir eftir “Kongelig anordning nr. 389 af 15. november 1966 om forsikring mod følger af ulykkestilfælde”.

**§ 80.** Henda løgtingslóg skal endurskoðast 3 ár eftir, at lógin er sett í gildi. Hetta fyri at meta um, hvørt lógin virkar eftir ætlan, ella um broytingar skulu gerast í skipanini.

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

**Søguligt yvirlit:**
Sambært kunngerð nr. 32 frá 28. mars 1980, sum heimilað í § 2 í heimastýrislógini, varð málsøkið "Lógskyldug vanlukkutrygging" yvirtikið sum føroyskt sermál frá 1. apríl 1980 at rokna.

Í omanfyri nevndu kunngerð er tó ásett, at "Anordning nr. 389 af 15.11.1966 om forsikring mod følger af ulykkestilfælde" framvegis skal vera í gildi í Føroyum, til nýggjar føroyskar reglur eru lýstar á økinum.

Í 1980 setti landsstýrið ein arbeiðsbólk umboðandi Føroya Vanlukkutrygging, Vanlukkutryggingarráðið, Almannastovuna, Tórshavnar-, Klaksvíkar- og Tvøroyrar kommunu í felag, Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Fiskimannafelag og Meginfelag Útróðrarmanna í felag og Føroya Reiðarafelag at gera álit um føroyskar reglur á vanlukkutryggingarøkinum.

Í 1988 handaði arbeiðsbólkurin landsstýrinum eitt álit um vanlukkutryggingarskipan fyri Føroyar, men so hendi ikki meira í málinum fyrr enn í 1995, tá landsstýrið setti ein nýggjan arbeiðsbólk, umboðandi somu áhugabólkar sum hin fyrri, at endurskoða álitið frá 1988. Við grundarlagi í fyrra álitinum frá 1988 læt seinni arbeiðsbólkurin tann 13. juni 1997 landsstýrinum álit og uppskot um vanlukkutryggingarskipan fyri Føroyar, og tann 13. februar 1998 legði táverandi landsstýrismaður í almannamálum fram "uppskot til løgtingslóg um vanlukkutrygging" ("1998-uppskotið") fyri Løgtingið, men uppskotið fall burtur, tí løgtingsval varð útskrivað stutt eftir.

Almanna- og heilsumálastýrið endurskoðaði síðani "1998-uppskotið" og gjørdi eitt nýtt "uppskot til løgtingslóg um arbeiðsskaðatrygging" (fyriliggjandi uppskot). Hetta uppskotið var klárt at leggja fyri Løgtingið á heysti 2000, men avgjørt varð kortini at bíða eftir ríkislógartilmælinum um at seta endurgjaldsábyrgdarlógina í gildi í Føroyum, soleiðis at bæði uppskotini kundu verða framløgd í tinginum samstundis.

Landsstýrismaðurin í almannamálum legði nýggja uppskotið um løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða fyri Løgtingið hin 4. mars 2003. Hin 24. mars 2003 gørdi Løgtingsins Trivnaðarnevnd av at senda uppskotið til ummælis hjá yrkisfeløgum, almennum myndugleikum, tryggingarfeløgum, áhugafeløgum o.ø., sí hjáløgdu fylgiskjøl. Uppskotið fall burtur, tí málið ikki var liðugt viðgjørt, tá tingsetan endaði.

Almanna- og heilsumálaráðið endurskoðaði uppskotið í sambandi við tey hoyringssvar, ið Trivnaðarnevndin móttók, eftir at tingsetan endaði. Tað er serliga kap. 10 í uppskotinum viðvíkjandi dagpengum, ið er broytt, soleiðis at Almannastovan umsitur alt viðvíkjandi dagpengum og at endurgjaldsábyrgdarlógin ikki verður løgd fyri Løgtingið samstundis.

**Galdandi vanlukkutryggingarskipan og "1998-uppskotið":**
Galdandi vanlukkutryggingarskipan í Føroyum "Anordning nr. 389 af 15.11.1966 om forsikring mod følger af ulykkestilfælde" (Vanlukkutryggingarlógin) svarar í høvuðsheitum til táverandi donsku "Ulykkesforsikringsloven", tó tillagað til føroysk viðurskifti. Danska skipanin er seinni munandi broytt og nútímansgjørd, meðan føroyska skipanin nærum hevur staðið óbroytt øll árini. Galdandi vanlukkutryggingarskipan hevur í høvuðsheitum til endamáls at veita endurgjald til teirra, sum vera fyri vanlukku ella deyða, meðan tey útinna arbeiði fyri annan persón (arbeiðstakarar), og arbeiðsgevarin hevur skyldu til at tekna trygging móti hesum avleiðingum.

Harumframt hava eisini ávís sjálvstøðugt vinnurekandi, m.a. tey, ið fáast við sjóvinnu og jarðarbrúk, skyldu at tryggja seg sjálvan móti vanlukkutilburði, elvdur av arbeiðsávum. Øll sjálvstøðugt vinnurekandi hava ikki tryggingarskyldu, men harafturímóti rætt til at tekna arbeiðsskaðatrygging fyri sín egna persón, soleiðis at tey koma undir vanligu ásetingarnar í vanlukkutryggingarlógini.

Landið og kommunurnar hava eftir galdandi skipan ikki skyldu til at lata ábyrgdarvandan sambært lógini til eitt tryggingarfelag, men hóast hetta hava flestu landsstovnar og kommunur kortini valt at tekna arbeiðsskaðatrygging hjá tryggingarfeløgunum í Føroyar, meðan landið hevur valt at verða sjálvtryggjað.

At enda kunnu ásetingarnar í galdandi vanlukkutryggingarskipan eisini nýtast í sambandi við aðrar sjálvbodnar vanlukkutryggingar, treytað av, at tryggingartakarin og tryggingarfelagið frammanundan hava avtalað, at ásetingarnar í vanlukkutryggingarlógini skulu vera galdandi.

Uppskotið til løgtingslóg um vanlukkutrygging, ið seinni arbeiðsbólkurin handaði landsstýrismanninum í 1997, og sum varð lagt fyri Løgtingið í 1998 (“1998-uppskotið”), er partvíst eitt framhald av galdandi vanlukkutryggingarskipan og partvíst ein nútímansgerð av lógarásetta vanlukkutryggingarøkinum, m.a. við støði í núverandi donsku arbeiðsskaðatryggingarlóg.

Umframt at áleggja arbeiðsgevarum tryggingarskyldu fyri arbeiðstakarar sínar, áleggur uppskotið eisini ávísum sjálvstøðugt vinnurekandi tryggingarskyldu fyri sín egna persón. Talan er um útróðrarmenn og tey, sum fáast við landbrúk.

Uppskotið áleggur ikki landinum tryggingarskyldu, men harafturímóti hava allar føroysku kommunurnar skyldu til at tekna trygging.

Harumframt fevnir uppskotið um allar aðrar sjálvbodnar – t.v.s. ikki lógarkravdar – vanlukkutryggingar, sum sostatt verða viðgjørdar á sama hátt sum tær lógarkravdu, tá tað ræður um málsviðgerð, endurgjaldsveitingar v.m.

**Nýggja uppskotið um arbeiðsskaðatrygging:**
Nýggja uppskotið frá Almanna- og heilsumálaráðnum til “løgtingslóg um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða” (Arbeiðsskaðatryggingarlógin) byggir á “1998-uppskotið” frá seinna arbeiðsbólkinum, men er samstundis enn meira útbygt, m.a. við enn fleiri ásetingum. Hetta verður gjørt við tí endamáli at nútímansgera føroysku skipanina, soleiðis at hon í størri mun enn áður kann nærkast teirri lóggávu og harvið eisini siðvenju, sum Danmark og hini norðurlondini hava á økinum, samstundis sum lóggávan eisini kemur at samsvara betur við teir millumlandasáttmálar, sum norðurlondini hava á økinum. Hóast Danmark tann 1. januar 2004 setti nýggja arbeiðsskaðatryggingarlóg í gildi, er tó eingin ætlan um at broyta uppskotið enn einaferð.

Við nýggju donsku lógini verður farið burtur frá nøkrum av høvuðsmeginreglunum í tí eldru donsku lógini, sum hetta lógaruppskotið tekur støði í, og verða krøvini til at viðurkenna mál sum arbeiðsskaðar linkað, umframt at málsviðgerðartíðin verður minkað, soleiðis at mál í mesta lagi mugu taka 1 ár at avgreiða, í mun til at tey áðrenn kundu taka upp í 2 ár. Tað verður mett, at áleið 1.000 fleiri arbeiðsskaðar fara at verða viðurkendir árliga í Danmark, sum avleiðing av broytingini, sum varð næstan einmælt samtykt av fólkatinginum. Nøkur tryggingarfeløg hava á

hesum grundarlagi boðað frá hækkingum í tryggingargjøldum. Ósemja er um, hvussu nógv broytingin fer at kosta teimum donsku tryggingarfeløgnum og tí almenna.

Tað verður ikki mett at vera realistiskt í løtuni at seta tær linkaðu donsku reglurnar í gildi í Føroyum, serliga út frá einum fíggjarligum atliti og út frá tí meting, at tað verður møguligt at áseta eina siðvenju, ið er í samsvari við hetta lógaruppskot og ynski um at kunna viðurkenna skaðar, ið eru hendir í sambandi við arbeiði.

Nýggja føroyska uppskotið um arbeiðsskaðatrygging fevnir um allar teir persónar, ið koma undir hugtakið "arbeiðstakari", t.v.s. tey, sum útinna eitthvørt arbeiði undir leiðslu og ábyrgd av øðrum persóni.

Harumframt eru eisini øll sjálvstøðugt vinnurekandi fevnd av uppskotinum. Hetta er ein týðandi broyting í mun til galdandi vanlukkutryggingarlóg og "1998-uppskotið", har bara ávís sjálvstøðugt vinnurekandi beinleiðis eru fevnd av trygging, meðan onnur sjálvstøðugt vinnurekandi mugu tekna sjálvbodna vanlukkutrygging fyri sín egna persón. Ásannandi, at øll sjálvstøðugt vinnurekandi prinsipielt eru í eins stórum vanda fyri at verða rakt av arbeiðsskaða, verður hildið rættast at lata øll sjálvstøðugt vinnurekandi verða fevnd av hesum uppskotinum. Hetta merkir eisini, at øll sjálvstøðugt vinnurekandi verða áløgd lógarkravda tryggingarskyldu fyri sín egna persón.

Eins og ásett er í "1998-uppskotinum", eru allar føroysku kommunurnar álagdar tryggingarskyldu, meðan landið kann velja at vera sjálvtryggjað.

Uppskotið hevur eisini víðkað um hugtakið "arbeiðsskaðar", soleiðis at enn fleiri sjúkutilburðir kunnu viðurkennast sum vinnusjúkur, eins og "brádliga hendir lyftiskaðar" nú eisini verða viðurkendir sum arbeiðsskaðar. Hesir skaðar kunnu eins og vinnusjúkurnar vera torførir at avgreiða, og tí var ætlanin sambært nýggja uppskotinum m.a. at leggja einstøku málini um lyftiskaðar fyri danska "Erhvervssygdomsudvalget", áðrenn Vanlukkutryggingarráðið tók endaliga avgerð, um tilburðurin kundi viðurkennast sum ein arbeiðsskaði. Erhvervssygdomsudvalget hevur sambært donsku lógini m.a. til endamáls at ummæla lyftiskaðarnar, áðrenn Arbejdsskadestyrelsen (sum er 1. instansur í donskum arbeiðsskaðatryggingarmálum) viðurkennir tilburðin sum ein arbeiðsskaða.

Tær lógargreinarnar í uppskotinum, sum viðvíktu Erhvervssygdomsudvalget, vórðu umsettar til danskt og sendar Arbejdsskadestyrelsen/Erhvervssygdomsudvalget til hoyringar, men hesir stovnar hava borið seg undan at luttaka í umsitingini av nýggju føroysku arbeiðsskaðatryggingarskipanini, m.a. við teirri grundgeving, at tey føroysku og donsku arbeiðsmarknaðarviðurskiftini eru so ymisk, at Erhvervssygdomsudvalget neyvan kann nýta sín kunnleika til at ummæla føroysk arbeiðsskaðamál. Harumframt vísir Arbejdsskadestyrelsen á, at í verandi líki heimilar danska lóggávan um arbeiðsskaðatrygging ikki Erhvervssygdomsudvalget at hava føroysk arbeiðsskaðamál sum part av sínum virksemi.

Niðurstøðan hjá Arbejdsskadestyrelsen er tikin til eftirtektar, og ásetingarnar um Erhvervssygdomsudvalget eru sostatt strikaðar í endaliga uppskotinum.

Hóast Vanlukkutryggingarráðið sostatt einsamalt skal avgreiða teir í byrjanini ivaleyst torføru spurningarnar um vinnusjúkur og brádliga hendar lyftiskaðar, so hevur Vanlukkutryggingarráðið kortini heimild til at leita sær sakkøna hjálp í einstøku málsviðgerðini. Í tann mun tað er gjørligt, kann henda sakkøna hjálpin væntandi fáast sambært avtalu við Arbejdsskadestyrelsen og/ella Erhvervssygdomsudvalget. Um nýggja arbeiðsskaðatryggingarskipanin skal virka eftir ætlan –

serliga við atliti til rættarstøðu hins tryggjaða – er neyðugt, at Vanlukkutryggingarráðið fær nøktandi karmar at arbeiða undir, bæði viðvíkjandi starvsfólki og peningaligari játtan.

Eisini heimilaðu veitingarnar eru víðkaðar í nýggja uppskotinum. Tað, sum í galdandi vanlukkutryggingarlóg verður nevnt avlamisendurgjald (invaliditetserstatning), er nú býtt upp í tvær veitingar, sum nevnast "endurgjald fyri mist arbeiðsføri" og "samsýning fyri varandi mein". Sum nakað nýtt í mun til galdandi vanlukkutryggingarskipan verður sambært nýggja uppskotinum altíð veitt ein "skiftisveiting" í sambandi við andlát orsakað av arbeiðsskaða. Ein partur av hesi veiting kemur í staðin fyri ta higartil heimilaðu veitingina "jarðarferðarhjálp".

Dagpeningur undir málsviðgerðini av vanlukkutryggingarmálum hevur higartil verið heimilaður í sjálvari vanlukkutryggingarlógini, og útgjaldingin hevur verið umsitin av Føroya Vanlukkutrygging (nú Tryggingarfelagnum Føroyar).

Tað finnast í dag 3 skipanir, sum veita dagpening í sambandi við sjúku ella skaða:

- Vanliga dagpeningaskipanin, sum verður umsitin av Almannastovuni.
- Sjúkratrygd til fiskimenn, sum verður umsitin av Lønjavningarstovuni.
- Dagpeningur sambært galdandi vanlukkutryggingarlóg.

Eftir galdandi vanlukkutryggingarlóg skulu dagpeningamøguleikarnir eftir vanligu dagpeningaskipanini og skipanini um sjúkratrygd fiskimanna troytast, áðrenn dagpeningur eftir vanlukkutryggingarlógini kann verða veittur. Í vanlukkutryggingarmálum merkir hetta sostatt vanliga, at fyrst verður dagpeningur rindaður av Almannastovuni (ella áðrenn tað Lønjavningarstovuni, um talan er um fiskimann) í mest loyvda tíðarskeiðnum, t.v.s. 40 vikur.

Í eini roynd at samskipa dagpeningaveitingina í arbeiðsskaðamálum betur, verður nú í staðin mælt til, at øll dagpeningaumsiting- og útgjalding verður løgd til Almannastovuna.

Skotið verður eisini upp, at ein afturberingarskipan (refusiónsskipan) verður gjørd millum tryggingarfeløgini/landið og Almannastovuna, soleiðis at dagpeningur, sum Almannastovan hevur goldið, til ein sum hevur verið fyri einum arbeiðsskaða, verður goldin av einum tryggingarfelag ella landinum.

Í tann mun landið velur at vera sjálvtryggjað, er tað landið, sum ber allar útreiðslurnar, um talan er um arbeiðsskaða. Tá tosað verður um landið, er tað ikki útreiðslur eftir t.d. dagpeningalógini, men hvør einstakur stovnur sum arbeiðsgevari. Hvør einstakur stovnur skal eisini gjalda Almannastovuni dagpeningin aftur.

**Myndugleikarnir, ið avgreiða vanlukkutryggingarmál/arbeiðsskaðamál:**
Sambært galdandi vanlukkutryggingarskipan er Færøernes Ulykkesforsikringsråd (Vanlukkutryggingarráðið) 1. instansur í føroyskum vanlukkutryggingarmálum, meðan Ankestyrelsen í Danmark virkar sum kærumyndugleiki. Í nýggja uppskotinum verður lagt upp til, at 1. instansurin kann vera samansettur á ein øðrvísi hátt enn higartil, t.v.s. uttan lógarásett krav um umboðan av ávísum áhugabólkum. Í hesum uppskotinum verður 1. instansurin eisini nevndur Vanlukkutryggingarráðið í staðin fyri Færøernes Ulykkesforsikringsråd/Føroya Vanlukkutryggingarráð.

Skipanin viðvíkjandi kærumyndugleikanum er eisini varðveidd í nýggja uppskotinum. Hetta er fyrst og fremst orsakað av rættartrygd hins tryggjaða, tí væntandi koma ásetingarnar í nýggja uppskotinum m.a. um brádliga hendar lyftiskaðar og vinnusjúkur í byrjanini at vera so truplar at

umsita hjá Vanlukkutryggingarráðnum, at neyðugt verður at hava ein royndan kærumøguleika at avgera ivamál, og sostatt leggja siðvenjuna á hesum økjum í fasta legu.

Málsøkið hevur verið føroyskt sermál síðani 1980, og verður miðað ímóti, at kæruviðgerðin einaferð í framtíðini kann takast heim til Føroyar at umsita.

Tær lógargreinar í uppskotinum, sum viðvíkja Ankestyrelsen – herímillum ein áseting um, at landskassin skuldi rinda fyri umsitingina av kærdum føroyskum arbeiðsskaðamálum – vórðu umsettar til danskt og sendar Ankestyrelsen til ummælis. Ankestyrelsen hevur boðað Almanna- og heilsumálaráðnum frá, at Ankestyrelsen framhaldandi er sinnað at virka sum kæru-myndugleiki fyri føroysk arbeiðsskaðatryggingarmál, men skal landskassin nú rinda umsitingarútreiðslurnar hjá Ankestyrelsen, sum standast av føroyskum kærumálum um arbeiðsskaðatrygging.

**Endurgjaldsábyrgdarlógin**
Endurgjaldsábyrgdarlógin (EAL) og arbeiðsskaðatryggingarlógin (ASL) eru í ávísan mun nær tengdar at hvørjari aðrari, m.a. soleiðis at endurgjaldsábyrgdarlógin er ein almenn lóg um endurgjaldsábyrgd, meðan arbeiðsskaðatryggingarlógin er ein serlig lóg fyri ávísar persónsbólkar.

ASL og EAL eru sostatt tvær sjálvstøðugar lógir, ið tó styðja hvørja aðra. EAL er heildarlógin fyri øll sløg av málum um endurgjald, meðan ASL er avmarkað til tey mál um endurgjald, ið eru komin fyri í sambandi við tilvildarligar arbeiðsskaðar.

Hvørji krøv kunnu gerast galdandi við atliti til tær tvær lógirnar?

| **Endurgjaldskravið** | **EAL** | **ASL** |
|---|---|---|
| | | |
| Mist arbeiðsinntøka | x | |
| Sviði og pína | x | |
| Varandi mein | x | x |
| Vinnuførismissur | x | x |
| Uppihaldsmissur | x | x |
| Skiftisupphædd v/uppihaldsmissi | x | x |
| Útreiðslur til jarðarferð | x | |
| Tortur | x | |
| Heilsuútreiðslur | x | x |
| Annar missur | x | |
| Útreiðslur til sakførara | x | |

Eins og sæst á yvirlitinum, eru krøvini um endurgjald, sambært uppskotinum til ASL, avmarkað í mun til tey krøv, ið kunnu verða sett sambært uppskotinum til EAL. Orsøkin til tess er, at tað er munur á treytunum fyri at seta krøv.

Fyri at royna sak um endurgjald sambært uppskotinum til Lóg um ábyrgdartrygging (EAL) krevst endurgjaldsábyrgd, tvs. ein endurgjaldskrevjandi gerð frá einum skaðavaldara (kulpa, skyld, meðvirkni)

Fyri at royna sak um endurgjald sambært uppskotinum til arbeiðsskaðatryggingarlóg (ASL), skal ein lúka tey í lógini ásettu krøv, t.d. at ein ólukka í sambandi við eitt starv skal vera fráboðað, ella at ein persónur er vorðin varandi sjúkur orsakað av, at viðkomandi er útslitin vegna arbeiði.

Um allar veitingarnar nevndar í EAL skulu flytast til ASL, vil tað fáa óyvirlítandi fíggjarligar avleiðingar fyri tryggingarfeløgini, ið teknað arbeiðsskaðatryggingar og fyri arbeiðsgevarnar, ið gjalda tryggingargjald til tryggingarfeløgini.

Innlendismálaráðið hevur enn ikki tikið støðu til, um og nær endurgjaldsábyrgdarlógin skal leggjast fyri Løgtingið aftur.

## Kap. 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 1. Fíggjarligu avleiðingarnar fyri landskassan

Sera tørført er at siga nakað ítøkiligt um, hvat uppskotið í krónum og oyrum kemur at kosta landskassanum. Orsøkin er í stuttum tann, at tað ikki ber til at staðfesta útreiðslustøðið, fyrr enn lógin hevur virkað eina tíð. M.a. kann bert verða gitt um, hvussu nógvar fleiri umsóknir um veitingar orsakað av arbeiðsskaðum verða sendar Vanlukkutryggingarráðnum sambært nýggju lógini í mun til galdandi vanlukkutryggingarlóg, men roknast kann við, at ásetingarnar um m.a. lyftiskaðar koma at hækka umsóknartalið munandi.

Sostatt er torført at seta eina ávísa krónuupphædd á fíggjarligu avleiðingar fyri landskassan, men vísast kann kortini á tey viðurskifti, sum broytast við nýggja uppskotinum, og sum ivaleyst koma at føra við sær fleiri útreiðslur fyri landskassan.

### 1.1 Vanlukkutryggingarráðið

Í uppskotinum er ásett, at landskassin ber allar *umsitingarútreiðslur hjá Vanlukkutryggingarráðnum*. Hetta er eisini galdandi skipan í dag. Talið av limum í Vanlukkutryggingarráðnum verður eisini tað sama sum higartil. Á skrivstovuni hjá Vanlukkutryggingarráðnum eru í dag 2 fulltíðarstørv. At sjálvum Vanlukkutryggingarráðnum er eisini knýttur ein skrivari, sum – eins og limirnir í ráðnum – fáa samsýning fyri hvønn fundin, sum vanliga er 1 ferð um vikuna. Dómarin, Landslæknin og skrivarin í ráðnum fáa eina hægri fundarsamsýning enn hinir 3 limirnir. Samlaði kostnaðurin av hesum stovni var í 2004 663 tkr. Vanlukkutryggingarráðið hevði eina inntøku í 2004 uppá 325 tkr., ið stavar frá "avgreiðslugjøldum" frá Tryggingarfelagnum Føroyar. Nettoúrslitið hjá Vanlukkutryggingarráðnum var sostatt góðar 300 tkr. í 2004, og væntast úrslitið í 2005 at verða áleið tað sama.

Greitt er, at skal nýggja uppskotið um arbeiðsskaðatryggingarlóg virka eftir ætlan - serliga við atliti til rættarstøðu hins tryggjaða - má Vanlukkutryggingarráðið fáa munandi størri játtan enn higartil. Bygnaðurin av nýggja uppskotinum, við m.ø. einum víðkaðum arbeiðsskaðahugtaki, lógarkravdari tryggingarskyldu fyri øll sjálvstøðugt vinnurekandi, umframt fleiri og hægri veitingum, kemur at seta stór krøv til virksemið Vanlukkutryggingarráðsins. Ikki minst víðkanin av teimum sonevndu vinnusjúkunum og staðfestingin av teimum sokallaðu brádliga hendu lyftiskaðunum sum arbeiðsskaðar, kemur – í hvussu er ta fyrstu tíðina – at krevja enn fleiri vælkvalifiserað starvsfólk í fyrireikandi málsviðgerðini hjá Vanlukkutryggingarráðnum, eins og

tað møguliga verður neyðugt at leita sær sakkøna hjálp uttanífrá tað fyrstu tíðina. Í 2002 var talið av málum í Danmark, sum komu undir lýsingarnar av vinnusjúkum og brádliga hendum lyftiskaðum, 37% av øllum arbeiðsskaðamálum. Hóast danska lóggávan og danski arbeiðsmarknaðurin ikki beinleiðis kann samanberast við føroysk viðurskifti, gevur býtið eina mynd av økingini í umsiting.

Sum áður nevnt, er trupult at staðfesta talið á umsóknum, men leysliga verður mett, at nýggja uppskotið førir við sær, at tørvur verður á umleið 3 starvsfólkum afturat til ta øktu málsviðgerðina í Vanlukkutryggingarráðnum: 2 fakfólkum til málsviðgerð og 1 skrivstovufólk. Kostnaðurin av Vanlukkutryggingarráðnum verður mettur at verða umleið 2 mió. kr. um árið, umframt 500 tkr. í stovningarkostnaði. Haraftrat skal fyrstu tíðina roknast við eykakostnaði til sakkøna hjálp uttanífrá í sambandi við víðkanina av "arbeiðsskaðahugtakinum".

Ein týðandi partur av málsviðgerðini fer í dag fram á Tryggingarfelagnum Føroyar, hóast hetta ikki er álagt teimum. Talan er her um eina innanhýsis avtalu millum tryggingarfelagið og Vanlukkutryggingarráðið.

Sum omanfyri nevnt, verður í dag rindað eitt "avgreiðslugjald" fyri hvørt mál, ið Vanlukkutryggingarráðið viðger. Í nýggja uppskotinum er ikki heimild at krevja eitt tilíkt gjald fyri mál, sum beinleiðis koma undir lógina um arbeiðsskaða. Harafturímóti verður gjald sett á fyrispurningar til Vanlukkutryggingarráðið viðvíkjandi persónskaða, sum ikki er fevndur av uppskotinum. Hetta gjald verður ásett av landsstýrismanninum.

Málsviðgerðarútreiðslurnar í 1. instansi, umframt veitingarnar sambært uppskotinum, verða rindaðar av tí, sum ber ábyrgdarvandan av arbeiðsskaðanum. Sum áður nevnt, ásetir nýggja uppskotið tryggingarskyldu fyri allar kommunurnar, meðan landið kann velja at vera sjálvtryggjað.

**1.2 Dagpeningaskipanin**

Sambært galdandi vanlukkutryggingarlóg skulu dagpeningamøguleikarnir eftir vanligu dagpeningaskipanini troytast, áðrenn dagpeningur eftir vanlukkutryggingarlógini kann verða veittur. Í galdandi skipan tekur dagpeningaskyldan við 15. dagin eftir arbeiðsskaðan, meðan tað í nýggja uppskotinum verður lagt upp til, at landið ella avvarðandi tryggingarfelag rindar dagpening frá 1. heila arbeiðsdegi eftir arbeiðsskaðan. Almannastovan leggur út dagpeningin og fær henda endurrindaðan frá arbeiðsgevaranum ella landinum (sjálvtryggjað).

Í dagpeningaskipanini eru ongar skrásetingar yvir sjúkuorsøkir, og tí kann einki sigast um, hvussu stórur partur av útgjøldunum stava frá arbeiðssjúkum ella arbeiðsvanlukkum.

Í uppskotinum verður mælt til, at øll dagpeningaumsiting- og útgjalding verður løgd til Almannastovuna, men skotið verður eisini upp, at ein afturberingarskipan verður gjørd millum landið og tryggingarfeløgini.

Tryggingarfelagið Føroyar upplýsir, at felagið vanliga hevur 20 til 40 útgjaldingar hvørja viku umframt útgjaldingar til arbeiðsgevarar.

**1.3 Kæruviðgerð**

Í uppskotinum er ásett, at landskassin ber *umsitingarútreiðslurnar hjá Ankestyrelsen*, sum virkar sum kærumyndugleiki í føroyskum arbeiðsskaðatryggingarmálum. Málsviðgerðarútreiðslurnar verða rindaðar av tí, sum ber ábyrgdarvandan fyri kærda arbeiðsskaðamálið, t.v.s. avvarðandi tryggingarfelag ella landskassin (sjálvtryggjað).

Ankestyrelsen er eisini kærumyndugleiki sambært galdandi skipan, men higartil hevur danski statskassin rindað allar útreiðslur hesum viðvíkjandi – bæði til umsiting og málsviðgerð. Tá málsøkið "lógskyldug vanlukkutrygging" hevur verið føroyskt sermál síðani 1. apríl 1980, er ikki rætt, at danski statskassin framhaldandi skal bera umsitingarútreiðslurnar av føroyskum arbeiðsskaðamálum, og tískil er ásett í uppskotinum, at landskassin skal rinda umsitingarútreiðslurnar.

Sum áður nevnt, hevur Ankestyrelsen játtað framhaldandi at virka sum kærumyndugleiki í føroyskum arbeiðskaðamálum, og í hesum sambandi hevur Ankestyrelsen sent Almanna- og heilsumálaráðnum "Arbejdsskadestyrelsens bekendtgørelse nr. 788 af 19. oktober 1999", sum í § 11 ásetir galdandi "umsitingargjøld" til Ankestyrelsen í arbeiðsskaðamálum (p.t. 6.766 kr. pr. mál). Í § 10 í somu kunngerð eru gjøldini fyri viðgerð av arbeiðsskaðamálum í Arbejdsskadestyrelsen nevnd, og hesi kunnu fáa týdning, um Arbejdsskadestyrelsen krevur hesi gjøld í sambandi við vegleiðandi ummælir um føroysk arbeiðsskaðatryggingarmál. Vanliga eru umleið 80 mál um árið, sum verða viðgjørd av Ankestyrelsen, og merkir tað eina útreiðslu til landskassan uppá umleið 550 tkr. Tað skal gerast vart við, at samstundis sum samlaða talið av umsóknum væntandi fer at vaksa munandi, er eisini talan um nýggjar ásetingar av m.a. lyftiskaðum og vinnusjúkum, og sostatt kunnu eisini væntast fleiri kærur og harvið eisini fleiri útreiðslurnar til kæruviðgerðir í Ankestyrelsen.

**2. Fíggjarligar avleiðingar fyri einstøku stovnarnar hjá landinum**

Landið hevur frá 2003 valt at verða sjálvtryggjað. Hetta merkir, at allar tær útreiðslur, sum eitt tryggingarfelag annars hevði avhildið, mugu rindast av landinum. Lønmóttakarin, tann tryggjaði, hevur krav uppá somu veitingar og rættindi sambært hesum uppskoti, sum ein tryggjaður, har arbeiðsgevarin hevur latið ábyrgdarvandan til eitt tryggingarfelag. Stovnar undir landinum, hava ikki longur útreiðslur av tryggingargjøldum og játtanin er lækkað tilsvarandi, men koma nú ístaðin at bera allar útreiðslur, um eitt starvsfólk fær ein arbeiðsskaða. Trupult er at meta um hesar útreiðslur. Er talan um álvarsligar skaðar, kann talan vera um stórar upphæddir, ið verða útgoldnar til tann tryggjaða, og hjá smærru stovnunum kann talan vera um stóran part av samlaðu játtan stovnsins.

Um landið velur at tekna arbeiðsskaðatrygging hjá einum tryggingarfelag (hóast landið ikki hevur skyldu til tess), kemur hetta eisini at hava við sær øktar útreiðslur fyri landskassan í tryggingargjøldum.

**3. Arbeiðsgevarar**

Ein avleiðing av nýggja uppskotinum verður ivaleyst, at *tryggingargjøldini (præmierne) fyri arbeiðsskaðatryggingar koma at hækka munandi* samanborið við í dag. Hetta er ein neyðug avleiðing av, at nýggja uppskotið samanlagt veitir tryggjaða munandi betri sømdir enn higartil, m.a. viðvíkjandi teimum skaðum og sjúkum, sum nú verða viðurkendar sum arbeiðsskaðar, umframt broyttu upphæddunum, ið verða veittar í endurgjaldi og samsýning.

Tryggingarfelagið Føroyar hevur gjørt nakrar útrokningar, sum vísa, at tryggingargjøldini í minsta lagi fara at hækka við umleið 40% útfrá teimum kendu avleiðingunum, nevnliga broytingin av lønarupphæddini, ið endurgjøld verða roknað av, broytingini av dagpengum og miss av vinnuføri, sí útrokningarnar í skjali 14. Viðmerkjast skal í hesum sambandi, at Tryggingarfelagið Føroyar tekur stór fyrivarni í metingini.

Haraftrat verður skotið upp, at lógin verður víðkað til eisini at fevna um vinnusjúkur og brádliga hendar lyftiskaðar. Nevnast kann, at í Danmark vóru endurgjøldini í 2002 til vinnusjúkur knappliga 1/3 av øllum endurgjøldum í arbeiðsskaðamálum.

At øll sjálvstøðu vinnurekandi nú verður áløgd tryggingarskyldu, kann hinvegin møguliga tálma hækkingini í tryggingargjøldunum, við tað at tað nú verða enn fleiri persónar til at bera ábyrgdarvandan hjá tryggingarfeløgunum.

**4. Arbeiðstakarar**

Dømi: Maður 40 ár, løn 150.000 kr.

| **Avlamni 5%** | **Galdandi lóg** | **Nýggja lógaruppskotið** |
|---|---:|---:|
| Avlamisendurgjald | 38.175 | - |
| Varandi mein | - | 20.000 |
| Miss av vinnuføri | - | 0 |
| Avlamisendurgjald í alt | 38.175 | 20.000 |

| **Avlamni 100%** | **Galdandi lóg** | **Nýggja lógaruppskotið** |
|---|---:|---:|
| Avlamisendurgjald | 1.262.320 | - |
| Varandi mein | - | 400.000 |
| Miss av vinnuføri | - | 1.144.440 |
| Avlamisendurgjald í alt | 1.262.320 | 1.544.400 |

Dømi: Maður 40 ár, løn 350.000 kr.

| **Avlamni 100%** | **Galdandi lóg** | **Nýggja lógaruppskotið** |
|---|---:|---:|
| Avlamisendurgjald | 1.262.320 | - |
| Varandi mein | - | 400.000 |
| Miss av vinnuføri | - | 2.670.360 |
| Avlamisendurgjald í alt | 1.262.320 | 3.070.360 |

Í tí seinasta døminum sæst eisini tann hækking, ið kemur av, at lønin, ið endurgjaldið verður roknað eftir, er hækkað í lógaruppskotinum frá 152.700 kr. til 350.000 kr.

**5. Samandráttur**

| **Fíggjarligar avleiðingar fyri landið** | **Galdandi lóg** | **Nýggja lógaruppskotið** |
|---|---:|---:|
| Vanlukkutryggingarráðið | 300.000 | 2.000.000 |
| Vanlukkutryggingarráðið stovningarkostnaður* | | 500.000 |
| Dagpeningaskipanin | - | 700.000 |
| Umsitingarútr. Ankestyrelsen | - | 550.000 |

* Bert fyrsta árið

*Fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan*:

- Kostnaðurin av Vanlukkutryggingarráðnum verður leysliga mettur at verða umleið 2 mió kr. umframt stovningarkostnað á 500 tkr. Núverandi kostnaður av Vanlukkutryggingarráðnum er umleið 300 tkr. árliga.
- Almannastovan yvirtekur dagpeningaumsiting og –útgjalding, og merkir hetta meira umsiting fyri landið.

- Landskassin skal bera umsitingarútreiðslurnar hjá Ankestyrelsen, og viðførir tað varliga mett eina eykaútreiðslu uppá umleið 550 tkr. árliga (sí viðmerkingar til kæruviðgerðir).

*Fíggjarligar avleiðingar fyri stovnar hjá landinum*:
- Landið hevur valt at vera sjálvtryggjað. Stovnar hjá landinum skulu bera allar útreiðslur, sum standast av einum arbeiðsskaða. Fyri álvarsligar skaðar er talan um munandi størri endurgjald, meðan fyri smærru skaðarnar verða endurgjøldini lægri.

*Fíggjarligar avleiðingar fyri arbeiðsgevarar*:
- Munandi hægri tryggingargjøld. Leysliga mett hækka tryggingargjøldini við umleið 40% útfrá teimum kendu avleiðingunum (broyting av lønarupphædd, ið endurgjøld verða roknað av, broyting í dagpengum og miss av vinnuføri). Haraftrat hækka tryggingargjøldini, tí skotið verður upp, at lógin eisini skal fevna um vinnusjúkur og brádliga hendar lyftiskaðar. Hesi endurgjøld vóru knappliga 1/3 av øllum endurgjøldum í arbeiðsskaðamálum í Danmark í 2002.

*Fíggjarligar avleiðingar fyri arbeiðstakarar*:
- Endurgjaldið fyri tey smáu avlamisstigini millum 5 og 15% verður minni eftir nýggju lógini, meðan endurgjaldið fyri tey størru avlamisstigini verður munandi størri.

**Aðrar avleiðingar**
Uppskotið hevur ongar umhvørvisligar avleiðingar ella avleiðingar fyri altjóða sáttmálar.

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar sam-felagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Ja | |

**Hoyring av uppskotinum:**

Viðmerkingar til lógaruppskotið frá Færøernes Ulykkesforsikringsråd, P/F Trygd, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Meginfelag Útróðrarmanna, Arbejdsskadestyrelsen og Den Sociale Ankestyrelsen. Hesi ummæli vórðu løgd við sum fylgiskjøl nr. 6 – 11, tá málið varð sent Vinnumálaráðnum.

Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Reiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag hava ikki gjørt viðmerkingar til lógaruppskotið.

Hesi hoyringsskriv vórðu løgd fyri Løgtingið í mars 2003.

Í sambandi við hoyringina av lógaruppskotinum hevur Almanna- og heilsumálaráðið havt nógv samskifti við Tryggingarfelagið Føroyar. Felagið hevur verið tað einasta tryggingarfelagið, sum teknar lógskyldugar vanlukkutryggingar í Føroyum, og má tí – næst eftir Færøernes Ulykkesforsikringsråd – metast at hava serligan kunnleika til hetta økið.

Skrivligu viðmerkingarnar frá Tryggingarfelagnum Føroyar viðgera í høvuðsheitum lógaruppskotið í smálutum, harav nógv av tilmælunum frá felagnum viðvíkjandi einstøku lógargreinunum eru tikin til eftirtektar av Almanna- og heilsumálaráðnum og broyttar í endaliga lógaruppskotinum.

Einstøku viðmerkingarnar frá Tryggingarfelagnum Føroyar eru ikki hjálagdar sum fylgiskjøl til lógaruppskotið, tí tær broytingar í lógaruppskotinum, ið hava staðist av samskiftinum við felagið, hava havt við sær, at í flestu førum samsvarar nummarið á lógargreinini í viðmerkingunum frá Tryggingarfelagnum Føroyar ikki við nummarið á lógargreinini í endaliga uppskotinum.

Tryggingarfelagið Føroyar hevur savnað tær prinsipiellu viðmerkingarnar, sum felagið hevur til uppskotið, og vóri tær hjálagdar sum fylgiskjal nr. 12, tá uppskotið varð sent Vinnumálaráðnum. Viðmerkjast skal í hesum sambandi, at hesar viðmerkingar eru gjørdar, áðrenn endalig avgerð varð tikin um at áleggja øllum sjálvstøðugt vinnurekandi tryggingarskyldu fyri sín egna persón.

Eftir at hoyringsfreistin var úti, og lógaruppskotið varð endaliga orðað við m.a. teimum tillagingum, ið hoyringin hevði við sær, varð uppskotið enn einaferð sent Færøernes Ulykkesforsikringsråd (Vanlukkutryggingarráðnum) til ummælis. Seinnu viðmerkingarnar frá Vanlukkutryggingarráðnum vóru hjálagdar sum fylgisskjal nr. 13. Hetta var í februar 2002.

Fyrst í januar 2003 var lógaruppskotið aftur sent til hoyringar hjá Fíggjarmálaráðnum, Vanlukkutryggingaráðnum, Tryggingarfelagnum Føroyar og Almannastovuni. Viðmerkingar frá hesum vóru lagdar við sum fylgiskjal 15, 16, 17 og 18.

Enn eitt hoyringsskriv frá Vanlukkutryggingaráðnum, dagfest 29. januar 2003, varð hjálagt sum fylgiskjal 16, og hoyringsskriv frá Tryggingarfelagnum Føroyar, dagfest 7. februar 2003, var hjálagt sum fylgiskjal nr. 17.

Lógaruppskotið við teimum seinastu broytingunum gjørdar í 2004 viðvíkjandi dagpeningi og samanseting av Vanlukkutryggingarráðnum hevur ikki verið sent út til hoyringar.

Viðvíkjandi dagpeningaspurninginum varð ístaðin settur ein arbeiðsbólkur umboðandi Almanna- og heilsumálaráðið, Tryggingarfelagið Føroyar og Almannastovuna, ið hevur gjørt uppskot til nýggju reglurnar um dagpengar í kapitli 10 í lógaruppskotinum. Frágreiðing frá fundi í arbeiðbólkinum vóru hjáløgd sum fylgiskjal 19.

Sorinskrivarin er við skrivi dagfest tann 15. november 2004 vorðin kunnaður um ætlanir landsstýrisins viðvíkjandi nýggju samansetingini av Vanlukkutryggingarráðnum. Skrivið var hjálagt sum fylgiskjal 20. Við skrivi dagfest tann 6. desember 2004 hava setti sorinskrivarin og limir í Vanlukkutryggingarráðnum sagt seg vera ivingarsom og víst á, at broytta samansetingin av ráðnum fer at hava við sær, at avgreiðsluskrivstovan hjá ráðnum á dómaraskrivstovuni verður

niðurløgd og hervið hava starvsfólkaligar og fíggjarligar avleiðingar fyri sorinskrivaraembætið. Svarið var hjálagt sum fylgiskjal 21. Almanna- og heilsumálaráðið hevur tikið hesar viðmerkingar til eftirtektar.

Fylgiskjal 22 er samandráttur av hoyringsskrivum send Trivnaðarnevndini beinleiðis í 2003, dagfest 15. desember 2004.

Lógaruppskotið hevur í september 2005 verið aftur til stutta hoyring hjá Almannastovuni, Vanlukkutryggingarráðnum, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og tryggingarfeløgunum.

Almannastovan ger í hoyringsskrivi dagfest 8. september 2005, vart við, at tað verður neyðugt við tveimum ársverkum afturat, um umsiting av dagpengaumráðnum í sambandi við arbeiðsskaðar verður flutt frá tryggingarfeløgunum til Almannastovuna. Hoyringssvarið var hjálagt sum fylgiskjal 23.

Vanlukkutryggingarráðið hevur í skrivi dagfest 22. september 2005, skotið upp ymsar lógartekniskar broytingar, ið eru tiknar til eftirtektar. Hoyringssvarið var hjálagt sum fylgiskjal 24.

Tryggingarfelagið Føroyar vísir í hoyringssvarinum frá 11. oktober 2005 til áður framdar viðmerkingar, ið enn eru aktuellar. Felagið skjýtur upp, at landið og ikki tryggingarfeløgini skulu rinda fyri endurgjald vegna vinnusjúkur. Hetta uppskot er ikki tikið til eftirtektar. Í staðin verður skotið upp, at lógin verður endurskoðað 3 ár eftir ígildiskomuna, fyri at meta um, hvørt lógin virkar eftir ætlan. Hoyringssvarið var hjálagt sum fylgiskjal 25.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Tryggingareftirlitið hava eftir áheitan eisini fingið uppskotið til kunningar. Nakrar av teirra viðmerkingum eru tiknar við í uppskotið. Hetta var hjálagt ávikavist sum fylgiskjøl 26 og 27.

Lógaruppskotið hevur harumframt verið til nýggja lógartekniska gjøgnumgongd í Innlendismálaráðnum, var hjálagt sum fylgiskjal 28.

Landdstýrismaðurin í Vinnumálum yvirtók økið frá 1. januar 2006. Omanfyri nevndu skjøl, sum vóruviðløgd uppskotinum, tá landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum lat landsstýrismanninum í vinnumálum uppskotið, verða ikki løgd uppskotinum, nú tað aftur verður sent til hoyringar, men um tað ynskist, kunnu tey verða send feløgunum o.ø., sum hava fingið uppskotið til hoyringar.

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

**Kapittul 1: Tey tryggjaðu**

**§ 1:**
Sambært stk. 1 eru høvuðstreytirnar fyri at koma undir lógina, at arbeitt verður fyri ein føroyskan arbeiðsgevara, og at arbeiðið verður útint á føroyskari landjørð ella á føroyskum sjóøki ella loftøki.

Ein "føroyskur arbeiðsgevari" er antin ein føroyingur ella útlendingur, sum er búsitandi í Føroyum, og sum hevur fulla ella partvísa skattaskyldu í Føroyum, ella eitt føroyskt ella útlendskt felag ella líknandi við heimstaði ella stjórn í Føroyum, og sum hevur fulla ella partvísa skattaskyldu í Føroyum. Í teirri samsvarandi donsku lógini verður skilnaður ikki gjørdur ímillum

danskar ella útlendskar arbeiðsgevarar, so leingi arbeiðið verður útint á donskun land- ella sjóøki ella loftrúmi.

At arbeitt verður fyri ein arbeiðsgevara vil í høvuðsheitum siga, at arbeiðstakarin sambært avtalu við arbeiðsgevaran skal útinna eitt veruligt arbeiði til fyrimuns fyri arbeiðsgevaran. Ein tílík avtala kann bæði vera munnlig, skrivlig ella tigandi. Harnæst krevst, at tann, ið útinnir arbeiðið, stendur undir leiðslu arbeiðsgevarans, t.v.s. at arbeiðsgevarin hevur ávirkan á eins og eftirlit við, hvussu arbeiðið verður útint, soleiðis at arbeiðstakarin hevur skyldu til at gera eftir boðum arbeiðsgevarans.

Eru omanfyri nevndu krøv lokin, hevur tað hinvegin ongan týdning, hvat slag av arbeiði, talan er um, starvstíðina, aldur á arbeiðstakaranum, ella lønarviðurskifti (viðvíkjandi hesum seinasta, sí tó § 1, stk. 3).

Eisini útlendingar eru tryggjaðir, um teir lúka vanligu treytirnar í lógini, t.v.s. um teir arbeiða fyri ein føroyskan arbeiðsgevara á føroyskum land- ella sjóøki (ella sigla við føroyskt skrásettum skipi, sbr. § 3).

Sjálvt um høvuðsbólkurin av teimum tryggjaðu sostatt er arbeiðstakarar, fevnir lógin eisini um ávísar aðrar persónar, sí §§ 5-7.

Hin høvuðstreytin sambært stk. 1 er, at arbeiðið verður útint á føroyskum landøki, sjóøki og loftrúmi yvir nevndu økjum. Hóast lógin sostatt byggir á tað sokallaða "territorialprinsippið" og tískil sum útgangsstøði ikki kann nýtast uttan fyri føroyskt land- ella sjóøki, kann landsstýrismaðurin gera undantøk frá hesi høvuðsreglu við heimild í ásetingunum í § 7.

Húski arbeiðsgevarans er sambært stk. 2 bert tryggjað, um tey á sama hátt sum aðrir arbeiðstakarar arbeiðsgevarans útinna eitt veruligt arbeiði, sum hevur týdning fyri raksturin av virksemi arbeiðsgevarans og í hesum sambandi standa undir leiðslu arbeiðsgevarans.

Ein hjúnafelagi, sum starvast hjá hinum hjúnafelaganum, kann sambært stk. 3 bert metast sum arbeiðstakari, um hjúnafelagarnir hava gjørt eina sínámillum lønaravtalu, ið m.a. inniber skyldu hjá arbeiðsgevarahjúnafelaganum til at afturhalda og gjalda inn A-skatt av lønarinntøkuni hjá hinum hjúnafelaganum. Fyri at staðfesta, um hesar treytir eru loknar, kann t.d. verða hugt eftir seinastu lønarútgjaldingini, ella – um ongin lønarútgjalding hevur verið frammanundan arbeiðsskaðanum – so á annan hátt at fáa staðfest, at talan er um verulig arbeiðsgevara-/arbeiðstakaraviðurskifti. Herdu krøvini til hjúnafelagar koma av, at tað kann vera trupult at skyna ímillum, um ein hjúnafelagi kann sigast at vera arbeiðstakari hjá hinum hjúnafelaganum, ella um hjúnafelagarnir reka virksemi í felag, m.a. við teirri avleiðing, at teir báðir mugu tekna sjálvbodna trygging fyri at verja seg móti fíggjarligu avleiðingunum av arbeiðsskaða.

**§ 2:**

Verður ein persónur mettur sum arbeiðstakari sambært § 1, er hann fevndur av lógini uttan mun til, hvat slag av arbeiði hann útinnir fyri arbeiðsgevaran. Hetta merkir m.a., at bæði vinnuligt og privat arbeiði fyri arbeiðsgevaran er fevnt av lógini. Sama er galdandi, um arbeiðstakarin útinnir annað arbeiði enn tað, hann er settur í starv til. Hóast arbeiðsgevarin í ávísum førum ikki hevur skyldu at tekna arbeiðsskaðatrygging, hevur arbeiðstakarin tó kortini altíð krav um tær í lógini nevndu veitingar, sum arbeiðsskaði heimilar honum, sí nærri §§ 11, stk. 2 og 21, stk. 2.

**§ 3:**

Greinin víðkar um geografiska øki lógarinnar, soleiðis at ikki bert persónar, sum arbeiða á føroyskum land-, loft- ella sjóøki, sbr. § 1, stk. 1, eru fevndir av lógini, men eisini sjófólk – føroyingar eins væl og útlendingar – sum við føroyskt skrásettum skipi – herundir skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni (FAS) – eru staddir uttan fyri føroyskt sjóøki.

Við sjófólk skilst manning í víðastu merking, t.v.s. ein og hvør persónur, sum er settur at arbeiða umborð á skipinum, og sum tískil vanliga fylgir við hagar, skipið fer. Harafturímóti fevnir greinin t.d. ikki um persónar, sum í fremmandari havn verða settir at ferma, lossa, umvæla ella reingera skipið.

Sum høvuðsregla er sjófólk við útlendskt skrásettum skipi – herímillum føroyingar – sum áður nevnt ikki fevnt av lógini, hóast skipið er statt á føroyskum sjóøki. Við heimild í § 7 kunnu hesir persónar tó við kunngerð verða tiknir inn undir lógina. Altjóða sáttmálar ("lovvalgs-konventioner") kunnu eisini áseta reglur um, hvørs lands lóggáva skal nýtast viðvíkjandi sjófólki.

**<u>§ 4:</u>**
Í stk. 1 verður staðfest, at øll sjálvstøðugt vinnurekandi eru fevnd av lógini t.v.s., at arbeiðsskaðamál hesum viðvíkjandi skulu viðgerast eftir ásetingunum í hesi lóg. Øll sjálvstøðugt vinnurekandi hava samstundis eina lógarásetta skyldu at tekna trygging fyri sín egna persón, og misrøking av hesi skyldu kann hava við sær mótrokning í møguligum veitingum sambært lógini umframt revsiábyrgd.

Stk. 2 ásetir, hvør er at rokna sum sjálvstøðugt vinnurekandi í mun til hesa lóg.

**<u>§ 5:</u>**
Greinin ásetir, at eisini onnur enn tey, sum beinleiðis hava verið fyri arbeiðsskaða, kunnu verða tryggjað eftir lógini. Fyri at fostrið ella barnið skal hava rætt til endurgjald krevst, at arbeiðið hjá móðurini ella pápanum er fevnt av lógini. Stk. 1 fevnir bert um sjúkuárin frá móðurini, meðan stk. 2 viðvíkur báðum foreldrunum. Fosturskaðar kunnu t.d. standast av ymiskum smittandi evnum ella strálingum, sum foreldrini hava fingið í seg orsakað av arbeiði teirra. Fosturskaðar verða í lógini javnsettir við vinnusjúkur, sbr. § 10, og verða viðgjørdir eftir somu reglum sum hesar sjúkur.

**<u>§ 6:</u>**
Greinin víðkar um tryggjaða persónsskaran til eisini at fevna um persónar, sum antin ikki koma undir vanliga arbeiðstakarahugtakið, ella persónar, sum eru arbeiðstakarar, men sum í konkreta førinum ikki koma til skaða ella gerast sjúkir, meðan teir útinna vanliga arbeiðið.

Nr. 1 viðvíkur persónum, sum tað almenna áleggur umboðan, sum viðkomandi hava skyldu at útinna, t.d. kommunustýrislimur ella skikkaður verji. Hesir persónar eru ikki arbeiðstakarar, sbr. § 1, men eru í yrki teirra kortini tryggjaðir sambært lógini.

Nr. 2 tekur álitisumboð og trygdarumboð inn undir lógina, hóast umboðini í hesum yrkjum ikki sum vanligir arbeiðstakarar standa undir leiðslu og ábyrgd arbeiðsgevarans.

Nr. 3 viðvíkur arbeiðstakarum, sum, meðan teir eru í tænastu arbeiðsgevarans, fremja ávísar bjargingarroyndir, sum ikki eru liðir í arbeiði teirra fyri arbeiðsgevaran. Hesir persónar eru fevndir av trygging arbeiðsgevarans, tí royndin t.d. verður framd í vanligu arbeiðstíðini, men møguligar veitingar, latnar sambært lógini, verða í hesum førum rindaðar av landskassanum, sbr. § 22, stk. 3.

Nr. 4 tryggjar allar aðrar persónar, enn teir, ið nevndir eru í nr. 3, t.v.s. persónar, sum fremja bjargingarroyndina í frítíðini, ella persónar, sum als ikki eru arbeiðstakarar. Einasta treyt er, at bjargingarroyndin verður framd á føroyskum land-, loft- ella sjóøki, t.v.s., at nr. 4 ikki kann nýtast uttan fyri føroyskt land-, loft- ella sjóøki. Veitingar sambært lógini til hesar persónar eru ikki fevndar av nakrari arbeiðsgevaratrygging, men verða somuleiðis rindaðar av landskassanum, sbr. § 22, stk. 3.

**§ 7:**
Greinin heimilar landsstýrismanninum at taka aðrar persónar enn teir, sum eru nevndir í §§ 1 og 3-6, inn undir lógina.

Landsstýrismaðurin kann víðka um geografiska øki lógarinnar. Sum áður nevnt, byggir arbeiðsskaðatryggingarlógin á „territorialprincippið", t.v.s., at lógin sum høvuðsregla bert er galdandi fyri arbeiðsskaðar, hendir á føroyskum land-, loft- ella sjóøki, meðan arbeitt verður fyri ein føroyskan arbeiðsgevara. Við heimild í nr. 1 kunnu arbeiðstakarar, sum ein føroyskur arbeiðsgevari fyribils sendir uttanlands at arbeiða, framhaldandi vera fevndur av føroyskari lóggávu í eitt ávíst tíðarskeið.

Heimildin í nr. 2 kann m.a. eisini nýtast til at áseta reglur um arbeiðsskaðtrygging í sambandi við eina møguliga frálandavinnu á føroyskum sjóøki. Ein tílík vinna fevnir í stóran mun um altjóða fyritøkur og útlendsk starvsfólk, og neyðugt verður tí ivaleyst í hesum førum at áseta nærri reglur um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða.

Sambært nr. 3 kunnu persónar undir útbúgving, har starvsvenjing v.m. er tvungin liður í útbúgving teirra, verða tiknir inn undir lógina. Talan er í hesum førum ikki um lærlingar hjá arbeiðsgevaranum, tí hesir lærlingar koma undir vanliga arbeiðstakarahugtakið í § 1. Talan er hinvegin um persónar, har eitt millumlið – útbúgvingarstovnurin – er millum arbeiðsgevaran og viðkomandi persón. Hóast hesir persónar sostatt eru í starvsvenjing hjá einum arbeiðsgevara, eru teir ikki arbeiðstakarar í lógarinnar týdningi, m.a. tí arbeiðsgevarin ikki hevur sama leiðslu- og eftirlitsmyndugleika við hesum persónum, sum við vanligu arbeiðstakarum sínum.

Sambært nr. 4 kann tryggingin eisini verða víðkað til at fevna um persónar, sum t.d. eru undir almennari forsorg og sum liður í hesi forsorg útinna eitthvørt arbeiði á stovni ella aðrastaðni. Hóast hesir persónar útinna eitthvørt arbeiði undir leiðslu og ábyrgd av øðrum persóni, so hava serligu viðurskiftini hjá hesum persónum við sær, at tey kortini ikki koma undir vanliga arbeiðsgevara-/arbeiðstakarahugtakið og sostatt heldur ikki eru fevnd av lógini, uttan serlig heimild gevur teimum hendan møguleikan.

Greinin er ikki "úttømandi", sbr. orðingina "herímillum".

## Kapittul 2: Arbeiðsskaðar

**§ 8:**
Greinin nevnir teir tilburðir, sum undir einum bera heitið arbeiðsskaðar.

Hugtøkini "brádliga hendir lyftiskaðar" og "vinnusjúkur" vera nærri lýst í §§ 9 og 10, meðan "vanlukkutilburðir" og "stutttíðar skaðilig árin" ikki vera nærri útgreinað aðrastaðni í lógini.

Fyrsta høvuðstreytin fyri, at tilburðurin kann viðurkennast sum ein arbeiðsskaði sambært hesi lóg, er, at tilburðurin læknafrøðiliga kann viðurkennast sum vanlukku- ella sjúkutilburður, nevndur í nr. 1- 4.

Vanlukkutilburðir, sbr. nr. 1, eru eftir fastari siðvenju at skilja sum “ein brádliga uttanífrá komin hending, ið er óheft av vilja hins tryggjaða, og sum hevur skaðiliga ávirkan á heilsustøðuna ella deyðan sum avleiðing”. Við “brádliga” skilst, at skaðiliga hendingin tekur rættiliga stutta tíð, t.d. eitt fall, ella at okkurt dettur oman yvir ein. Við orðunum “uttanífrá komin hending” verður staðfest, at talan er ikki um arbeiðsskaða, um vanlukkutilburðurin einans er elvdur orsakað av heilsustøðu hins skadda frammanundan tilburðinum. At tilburðurin skal vera “óheftur av vilja hins tryggjaða” merkir, at viðkomandi sjálvur ikki má hava høvuðsábyrgdina av, at skaðin hendi, sí § 40.

Stutttíðar skaðilig árin, sbr. nr. 2, eru sambært siðvenju árin, sum t.d. orsakað av arbeiðshátti, arbeiðstilfari ella arbeiðsumhvørvi ávirka heilsustøðuna í minsta lagi 2-3 tímar og í mesta lagi 5 dagar. Varir skaðiliga arbeiðið í meira enn 5 dagar, skal tilburðurin koma undir § 10 um vinnusjúkur fyri at verða viðurkendur sum arbeiðsskaði sambært hesi lóg.

Viðvíkjandi brádliga hendum lyftiskaðum og vinnusjúkum, verður víst til §§ 9 og 10.

Hin høvuðstreytin fyri, at tilburðurin kann koma inn undir lógina, er, at tilburðurin løgfrøðiliga kann viðurkennast sum arbeiðsskaði, t.v.s., at tilburðurin hendi, meðan viðkomandi útinti eitt arbeiði fyri ein arbeiðsgevara, og at hetta arbeiðið ella arbeiðsumstøðurnar eru orsøk til skaðan ella sjúkuna. Hetta merkir m.a., at vanlukku- ella sjúkutilburðir, sum henda í frítíðini, ella meðan arbeitt verður fyri ein sjálvan, ikki eru fevndir av lógini, tí í hesum førum hevur arbeiðsgevarin onga ávirkan á vandan fyri skaða ella sjúku. Sama er sum høvuðsregla galdandi, tá ferðast verður til og frá arbeiði, men sambært siðvenju fevnir tryggingin eisini um tílíka ferðing í ávísum førum, t.d. tá arbeiðstakarin á veg heim ger eitthvørt ørindi fyri arbeiðsgevaran, ella arbeiðstakarin verður biðin til arbeiðis eftir vanliga arbeiðstíð.

Ein viðurkenning av einum arbeiðsskaða er samstundis eisini ein viðurkenning av einari og hvørjari beinleiðis fylgju av hesum tilburði. Harumframt kann seinni hendur vanlukku- ella sjúkutilburður eftir umstøðunum verða viðurkendur sum óbeinleiðis fylgja av arbeiðsskaða, treytað av, at fylgjan hevur samband við upprunaliga arbeiðsskaðan.

**<u>§ 9:</u>**
Brádliga hendir lyftiskaðar vórðu í 1996 viðurkendir sum arbeiðsskaðar í Danmark, men hava ikki áður verið heimilaðir í føroyskari lóggávu. Hesir lyftiskaðar kunnu ikki viðurkennast sum “vanlukkutilburðir”, sbr. § 8, nr. 1, tí teir ikki eru ein uttanífrá komin hending, ið er óheft av vilja hins tryggjaða. Somuleiðis hendir tilburðurin so brádliga, at hann ikki lýkur tær sambært siðvenju ásettu treytirnar um 3-4 tímar skaðiligt árin, áðrenn skaðin kann viðurkennast sum “stutttíðar skaðilig árin”, sbr. § 8, nr. 2. At enda kundu lyftiskaðarnir heldur ikki viðurkennast sum “vinnusjúkur”, sbr. § 8, nr. 4, tí sambært siðvenju varð sett krav um fleiri ára tungt lyftiarbeiði, áðrenn t.d. ein ryggskaði kundi viðurkennast sum vinnusjúka.

Strong krøv verða sett fyri, at ein lyftiskaði kann viðurkennast sum arbeiðsskaði. Fyri tað fyrsta skal skaðin standast av lyfting, t.v.s., at skaðar, ið einans standast av t.d. togan ella draging, eru ikki fevndir av hesi grein, men kunnu møguliga vera arbeiðsskaðar eftir øðrum reglum í lógini. Skaðin skal henda brádliga, t.v.s. beinanvegin geva seg til kennar, tá lyft verður, og skal henda persóni, sum dagliga fæst við tyngjandi lyftiarbeiði. Harumframt skal skaðin henda í óvanligari lyftistøðu ella í ringari arbeiðsstøðu, t.d. við ørmunum langt út frá kroppinum ella í

framáboygdari lyftistøðu, og hendan lyftistøðan skal vera beinleiðis orsøkin til skaðan. At enda eru tað bert varandi vødda-, nerva- ella liðskaðar, sum verða viðurkendir sum arbeiðsskaðar eftir hesi grein.

Omanfyri nevndu krøv skulu virka fyri, at bert tey, ið av arbeiðsávum eru í serligum vanda fyri nevndu skaðum, eru fevnd av lógini.

**§ 10:**
Vinnusjúkur eru sermerktar við, at tær ofta ikki geva seg til kennar, fyrr enn long tíð er liðin, síðani skaðiliga ávirkanin byrjaði. Hvørjar sjúkur kunnu metast sum vinnusjúkur, er fyrst og fremst ein læknafrøðilig meting, sum broytist so hvørt, sum læknafrøðiliga vitanin um skaðiligar arbeiðshættir, framleiðsluevnir og arbeiðsumhvørvi økist. Tískil er neyðugt, at tann í greinini nevnda kunngerðin um vinnusjúkur verður broytt í samsvari við hesa nýggju vitan. At ein ávís sjúka ikki er nevnd í kunngerðini merkir ikki, at sjúkan ikki kann viðurkennast sum arbeiðsskaði, sí stk. 1, nr. 2 og stk. 2. Hinvegin hevur tað týdning fyri próvbyrðuna, um sjúkan er nevnd í kunngerðini ella ikki, tí greinin gevur eina ábending um, at ein sjúka, nevnd í kunngerðini, er elvd av arbeiðsávum, meðan strangari krøv verða sett til sambandið millum arbeiðið og sjúkuna, um sjúkan ikki er nevnd í kunngerðini.

Sum eisini nevnt undir § 5 eru tað ikki einans teir persónar, sum beinleiðis eru fyri skaðiligum árinum, sum eru fevndir av lógini, men eisini børn, sum í móðurlívi ella seinni hava fingið skaða ella sjúku, kunnu fáa veitingar eftir lógini.

**Kapittul 3: Tey tryggingarskyldugu**

**§ 11:**
Ein og hvør persónur, felag ella líknandi, sum samsvarandi § 1 og § 2 kann metast sum arbeiðsgevari, hevur sum høvuðsregla skyldu at tryggja arbeiðsfólk sítt.

Í stk. 2 er tó ásett eitt minstamark fyri, nær arbeiðsgevari skal tryggja ávísar persónar við ávísum arbeiðsuppgávum. Hóast hetta hevur hesin arbeiðstakari kortini rætt til veitingar sambært lógini, sí § 21, stk. 2.

**§ 12:**
Sum áður nevnt undir § 3, fevnir lógin eisini um sjófólk, sum arbeiða umborð á føroyskt skrásettum skipum.

Greinin ásetir, at hóast manningin stendur undir beinleiðis leiðslu og ábyrgd skiparans, er tað reiðarin á skipinum, sum er tryggingarskyldugur arbeiðsgevari. Hinvegin fevnir tryggingarskyldan bert um teir persónar – herímillum eigararnar av skipinum – sum undir leiðslu skiparans útinna eitthvørt arbeiði umborð á skipinum.

Stuttleikasiglin er í hesi lóg at meta sum øll privat sigling, har talan ikki er um inntøku ella vinnuligt endamál. Í tí løtu ein skipari fær løn fyri sigling, t.d. við gjaldandi ferðafólki, er talan ikki um stuttleikasigling.

**§ 13:**
Greinin ásetir, hvør av møguliga fleiri arbeiðsgevarum hevur tryggingarskylduna.

Høvuðsreglan er, at tryggingarskyldugi arbeiðsgevarin er tann arbeiðsgevarin, í hvørs tænastu arbeiðsskaðin hendi. Tá talan er um vanlukkutilburð, sbr. § 8, nr. 1, ella stutttíðar skaðiligt árin, sbr. § 8, nr. 2, kann tað oftast nágreinliga staðfestast, nær arbeiðsskaðin hendi, og tíkil vil tað í hesum førum eisini bara vera tann eini arbeiðsgevarin, sum hevur ábyrgdina. Øðrvísi kann vera við brádliga hendum lyftiskaðum, sbr. § 8, nr. 3, og serliga vinnusjúkum, sbr. § 8, nr. 4. Hesir arbeiðsskaðar kunnu hava ment seg gjøgnum fleiri ár, meðan arbeiðstakarin arbeiddi hjá einum arbeiðsgevara, fyri so at geva seg til kennar stutt eftir, at arbeiðstakarin er farin í starv hjá nýggjum arbeiðsgevara. Í hesum førinum vil tað ikki vera rætt at áleggja nýggja arbeiðsgevaranum ábyrgdina av arbeiðsskaðanum og harvið eisini tryggingarskylduna. Spurningurin um, hvør av møguliga fleiri arbeiðsgevarum hevur ábyrgdina, kemur sjálvsagt bara upp á tal, um arbeiðið fyri núverandi arbeiðsgevaran eisini kann hava elvt til arbeiðsskaðan.

**<u>§ 14:</u>**
Stk. 1 ásetir, hvør hevur tryggingarskylduna, tá ein arbeiðstakari, sum er settur í starv og verður løntur av einum persóni, nýtir sína arbeiðsmegi fyri ein annan persón. Avgerandi fyri tryggingarskylduna í hesum førum er, hvør av arbeiðsgevarunum hevur leiðsluna av, hvussu og hvar arbeiðstakarin nýtir sína arbeiðsmegi.

Stk. 2 viðger spurningin, hvør hevur tryggingarskylduna, tá ein útinnandi arbeiðsgevari sum triði persónur er millum arbeiðstakaran og tann, ið eigur virkið. Avgerandi er í hesum førum, um útinnandi arbeiðsgevarin kann sigast at starvast í tænastu hjá tí, sum eigur virkið, ella um útinnandi arbeiðsgevarin er sjálvstøðugt vinnurekandi. Persónurin, sum eigur virkið, hevur, sbr. stk. 2, 1. pkt., tryggingarskylduna fyri teir persónar, sum útinnandi arbeiðsgevari í hansara tænastu setir í starv og lønir, meðan ein sjálvstøðugur vinnurekandi, sbr. stk. 2, 2. pkt., sjálvur hevur tryggingarskylduna fyri arbeiðsfólkið í sínari tænastu, eisini tá arbeiðsfólkið útinnir arbeiðið fyri annan arbeiðsgevara.

**<u>§ 15:</u>**
Greinin staðfestir, at øll sjálvstøðugt vinnurekandi hava eina lógarásetta skyldu til at tryggja sín egna persón móti avleiðingunum av arbeiðsskaða, og at henda trygging skal fremjast samsvarandi ásetingunum í hesi lóg.

## Kapittul 4: Arbeiðsskaðatryggingin

**<u>§ 16:</u>**
Allir arbeiðsgevarar - herundir eisini allar tær føroysku kommunurnar – umframt øll sjálvstøðugt vinnurekandi - skulu tekna arbeiðsskaðatrygging hjá einum tryggingarfelag, meðan landið kann velja at vera sjálvtryggjað, t.v.s. sjálvt bera tryggingarábyrgdina og sostatt úr egnum kassa rinda møgulig endurgjalds- og samsýningarkrøv sambært lógini.

Landið hevur valt at vera sjálvtryggjað frá 2003.

Við at áleggja øllum føroysku kommununum og øllum privatum arbeiðsgevarum tryggingarskyldu, slepst undan, at tryggjaði orsakað av vantandi fíggjarorku hjá kommununi ella arbeiðsgevaranum ikki fær tær veitingar, sum hann sambært lógini hevur rætt til, eins og henda skipan tryggjar, at kommunan ella arbeiðsgevarin ikki kemur í fíggjarligt óføri orsakað av krøvunum.

Í dag er tað bert Tryggingarfelagið Føroyar, ið teknar tílíkar tryggingar, men sambært løgtingslóg nr. 3 frá 13. februar 1996 um tryggingarvirksemi við seinni broytingum hava eisini onnur tryggingarfeløg møguleikan at søkja um loyvi at tekna arbeiðsskaðatryggingar.

Viðvíkjandi avleiðingunum, um lógarásetta tryggingarskyldan ikki verður yvirhildin, verður víst til §§ 17 og 78.

**§ 17:**
Greinin viðvíkir eftirstøðum av tryggingargjøldum, sum ein arbeiðsgevari (herundir kommunurnar) ella ein sjálvstøðugt vinnurekandi ikki hevur goldið. Ásetingarnar eru galdandi, uttan mun til um arbeiðsskaði er hendur ella ikki.

Fyri sjálvstøðugt vinnurekandi kunnu eftirstøður í tryggingargjøldum verða mótroknaðar í veitingum, sum tann sjálvstøðugt vinnurekandi orsakað av arbeiðsskaða hevur rætt til.

Hóast tað er avvarðandi tryggingarfelag, sum innheintar eftirstøður av tryggingargjøldum – og í hesum sambandi hevur beinleiðis útpantingarrætt – er tað kortini Vanlukkutryggingarráðið, sum í serligum førum hevur heimildina til at gera frávik frá reglunum um tryggingareftirstøður.

**§ 18:**
Greinin ásetir, at ein sambært lógini tryggjaður persónur varðveitir øll síni rættindi mótvegis tryggingarfelagnum, hóast arbeiðsskaðatryggingaravtalan millum arbeiðsgevaran og tryggingarfelagið t.d. ikki fevnir um júst henda persónin ella hansara arbeiði. Sum dømi kann nevnast, at ein arbeiðsgevari hevur teknað trygging fyri teir persónar, sum arbeiða í vinnuvirki hansara, men ikki fyri teir persónar, sum útinna tryggingarskyldugt arbeiði í húsarhaldi hansara. Hóast hetta, hava eisini tey, sum arbeiða í húsarhaldinum, rætt til veitingar sambært lógini, um tey vera fyri arbeiðsskaða. At tryggingarfelagið eftirfylgjandi – og sambært øðrum reglum – kann krevja arbeiðsgevaran eftir einum hægri tryggingargjaldi, hevur sostatt onga ávirkan á rættarstøðu hins tryggjaða.

Á sama hátt kann eitt tryggingarfelag ikki sleppa sær undan ábyrgdarvandanum mótvegis einum sjálvstøðugt vinnurekandi, hóast tryggingarfelagið heldur seg hava átikið sær ábyrgdarvandan undir skeivum fortreytum.

**§ 19:**
Greinin ásetir, at eisini smáir arbeiðsskaðar, sæð í mun til samlaðu heilsustøðuna hjá tryggjaða, eru fevndir av lógini og sostatt kunnu geva rætt til veitingar. Men samstundis verður eisini staðfest, at viðurkenningin av einum arbeiðsskaðtilburði bert fevnir um avleiðingarnar, ið standast av arbeiðsávum. Vanlukkutryggingarráðið kann sostatt í sambandi við viðurkenningina av tilburðinum sum arbeiðsskaði taka fyrivarni t.d. viðvíkjandi skaðum, sum tryggjaði hevði longu frammanundan arbeiðsskaðan, og sum sambært § 39 sostatt ikki skulu teljast við í metingini um avleiðingarnar av arbeiðsskaðanum. Hinvegin gevur § 39 eisini eina greiða ábending um, at ávísar fylgjur skulu metast sum avleiðingar av arbeiðsskaða, uttan so at annað verður prógvað.

**§ 20:**
Greinin avmarkar tryggingarfulnaðin fyri arbeiðsskaðar í serligum førum. Taka Føroyar lut í vápnaðum stríði, eru skaðar, sum standast av stríðsávum, ikki arbeiðskaðar, men annars er lógin eisini galdandi í stríðsstøðu. Sjófólk, sbr. § 3, er tó tryggjað sambært lógini undir útinnan av vanliga arbeiði teirra sum sjófólk, eisini um arbeiðsskaðin er elvdur av stríðsávum.

**§ 21:**
Greinin staðfestir fyri tað fyrsta, at ein arbeiðstakari fær tær veitingar, hann hevur rætt til sambært lógini, sjálvt um arbeiðsgevari hansara hevur misrøkt sína tryggingarskyldu. Sama er sum høvuðsregla galdandi fyri tann sjálvstøðugt vinnurekandi, men her kann mótrokning koma upp á tal viðvíkjandi eftirstøðum í tryggingargjøldum.

Hóast bert tvey tryggingarfeløg í dag tekna arbeiðsskaðatryggingar í Føroyum, hava eisini onnur tryggingarfeløg møguleikan fyri hesum í framtíðini, og neyðugt er tí við nærri reglum um, hvussu peningurin til málsviðgerðarútreiðslur og veitingar skal rindast, um hesar skyldur møguliga í framtíðini skulu áleggjast fleiri tryggingarfeløgum.

Nærri reglur um hetta býtið verða ásettar av landsstýrismanninum í kunngerð.

Landið hevur tó, sambært § 16, ikki skyldu til at lata ábyrgdarvandan sambært hesi lóg til eitt tryggingarfelag. Um landið velur at vera sjálvtryggjað, mugu tær útreiðslur, sum eitt tryggingarfelag annars hevði hildið sambært hesi lóg, verða rindaðar av landinum sjálvum. Lønmóttakarin ella tann tryggjaði hevur rætt til veitingar sambært hesi lóg, sjálvt um landið sum arbeiðsgevari hevur valt at vera sjálvtryggjað.

**§ 22:**
Greinin ásetir, hvør skal rinda útreiðslurnar av málsviðgerð og veitingum til teir persónar, sum ikki koma undir vanliga arbeiðstakarahugtakið, men sum sambært § 6 kortini eru tryggjaðir eftir lógini.

Um landið sambært § 16, stk. 2 velur at vera sjálvtryggjað, skal landið rinda fyri teir arbeiðsskaðar, sum henda borgarligum umboðum, sbr. § 6, nr. 1. Er talan um kommunala umboðan, verða útreiðslurnar altíð rindaðar av tryggingarfelagnum (ella øllum tryggingarfeløgunum, sbr. § 21), tí kommunurnar skulu altíð lata ábyrgdarvandan til eitt tryggingarfelag.

Arbeiðsgevarin (t.v.s. eitt ávíst tryggingarfelag, ella øll tryggingarfeløgini) hevur altíð ábyrgdina av álitisumboðunum, sbr. § 6, nr. 2, tí hóast hesir persónar ikki koma undir vanliga arbeiðstakarahugtakið, so henda hesir arbeiðsskaðar kortini oftast í arbeiðstíðini og á arbeiðsplássinum.

Útreiðslurnar til teir í § 6, nr. 3 og nr. 4 nevndu persónar verða altíð rindaðar av landskassanum.

## Kapittul 5: Fráboðan um arbeiðsskaðar

**§ 23:**
Vanliga eru tað ikki trupulleikar við fráboðanarfreistini, tá talan er um vanlukkutilburðir og brádliga hendar lyftiskaðar, tí í hesum førum fer onkur avleiðing av tilburðinum oftast beinanvegin at geva seg til kennar. Hinvegin kann tað ganga long tíð, áðrenn t.d. ein vinnusjúka ger seg galdandi, og tískil byrjar fráboðanarfreistin í hesum førum ikki, fyrr enn tann fráboðanarskyldugi gerst varugur við, at talan kann vera um arbeiðsskaða.

Bert tilburðir, ið kunnu væntast at geva rætt til veitingar sambært lógini, skulu fráboðast Vanlukkutryggingarráðnum, og tískil kann tað ofta vera torført hjá tí fráboðanarskylduga at meta um ein skaða- ella sjúkutilburður eigur at verða fráboðaður sum arbeiðsskaði. Fyri at 7 daga

freistin ikki skal útihýsa viðurkenning av annars rættvísum krøvum, ásetir stk. 2 eina nýggja 7 daga freist fyri fráboðan.

Stk. 5 ásetir, at tryggjaði ikki missir síni rættindi sambært lógini orsakað av, at tann fráboðanarskyldugi ikki rættstundis boðar frá arbeiðsskaðum. Síggjast kann eisini burtur frá longdu 1 ára fráboðanarfreistini, um tryggjaði ella hansara avvarðandi meira enn 1 ár eftir tilburðin t.d. ikki hava verið greið yvir, at talan var um arbeiðsskaða. Dagpeningur undir málsviðgerðini kann tó í hesum føri bert veitast frá fráboðanardegnum og ikki sum í vanligum førum frá tí degi, tilburðurin hendi.

**<u>§ 24:</u>**
Tá ein tilburður, fevndur av lógini, hendir í tænastu hjá einum arbeiðsgevara, áleggur lógin tryggingarskylduga arbeiðsgevaranum at boða frá hesum tilburði. Hetta er eisini galdandi fyri teir arbeiðsskaðar, sum arbeiðsgevarin sambært § 11, stk. 2 ikki hevur skyldu at tryggja.

Er talan um sjálvstøðugt vinnurekandi ella teir í § 6, nr. 4 nevndu persónar, hendir arbeiðsskaðin ikki, meðan arbeitt verður fyri ein arbeiðsgevara, og tískil er tað álagt tryggjaða sjálvum, ella í ringasta føri hansara avvarðandi at fráboða tilburðin.

Fyri at tryggja, at arbeiðsskaðar verða fráboðaðir so skjótt sum til ber, eru eisini læknar og tannlæknar álagdir fráboðanarskyldu. Fráboðanarskyldan áliggur fyrst og fremst arbeiðsgevaranum, sbr. stk. 1, men tá talan er um t.d. vinnusjúkur, er tað oftast ein lækni ella tannlækni, sum fyrst gerst varugur við, at sjúkan kann vera elvd av arbeiðsávum, og tískil hava hesir eisini skyldu til at geva Vanlukkutryggingarráðnum boð um hetta innan ásettu freistirnar í § 23. At tað fyrst og fremst er arbeiðsgevarin, sum hevur fráboðanarskylduna, sæst eisini av, at sambært § 78 er tað bert arbeiðsgevarin, sum kann áleggjast sektarábyrgd fyri misrøking av hesi skyldu. Fráboðanarskyldan hjá læknum og tannlæknum er sostatt einans ætlað sum ein eyka trygd fyri, at allir arbeiðsskaðar verða fráboðaðir skjótast gjørligt.

**<u>§ 25:</u>**
Greinin hevur sum fortreyt, at tryggjaði skjótast gjørligt eftir tilburðin letur seg kanna av lækna, sum síðani útflýggjar eina læknaváttan, ið skal latast Vanlukkutryggingarráðnum saman við fráboðanini um arbeiðsskaðan.

Nærri mannagongd í sambandi við fráboðan av arbeiðsskaðum verður ásett av landsstýrismanninum, eftir tilmæli frá Vanlukkutryggingarráðnum.

## Kapittul 6: Málsviðgerðin

**<u>§ 26:</u>**
Vanlukkutryggingarráðið tekur sum 1. instansur avgerð um allar tryggingarspurningar sambært hesi lóg.

Høvuðsuppgávan hjá Vanlukkutryggingarráðnum er sostatt tann sama sum higartil, t.v.s. at umsita arbeiðsskaðatryggingarlógina (fyrr vanlukkutryggingarlógina).

Stk. 2 heimilar Vanlukkutryggingarráðnum at geva vegleiðandi ummæli um t.d. avlamisstig í sambandi við t.d. frítíðartryggingar.

Fleiri av heimilaðu veitingunum í endurgjaldsábyrgdarlógini og hesari lógini eru tær somu, og tí kunnu tryggingarspurningar sambært endurgjaldsábyrgdarlógini eisini eftir áheitan leggjast fyri Vanlukkutryggingarráðið.

Tær niðurstøður, sum Vanlukkutryggingarráðið kemur til í málum viðvíkjandi tryggingum, ið ikki eru fevndar av lógini, kunnu ikki kærast til Ankestyrelsen, sbr. § 35, stk. 1.

**§ 27:**
Vanlukkutryggingarráðið hevur sama tal av ráðslimum sum higartil.

Vanlukkutryggingarráðið er mannað við Sorinskrivarin sum formanni og harafturat lands-læknanum.

Ein broyting er, at av teimum trimum limunum, sum landsstýrismaðurin velur, er tað ikki longur ein treyt, at tveir teirra skulu umboða ávíkavist tey tryggjaðu og teir tryggingarskyldugu arbeiðsgevararnar, men hinvegin er onki, sum forðar fyri, at hesi eisini frameftir verða umboðað í ráðnum.

Stk. 4 heimilar Vanlukkutryggingarráðnum at leita sær sakkøna hjálp í einstøku málsviðgerðini. Hendan heimildin kann fyrstu tíðina t.d. nýtast til at leita sær hjálp hjá Arbejdsskadestyrelsen/Erhvervssygdomsudvalget í torførum ivaspurningum um vinnusjúkur og brádliga hendar lyftiskaðar.

Umsitingarútreiðslurnar, nevndar í stk. 6, eru t.d. útreiðslur til skrivstovuhald, høli og samsýning til limirnar í ráðnum, og verða tær rindaðar av landskassanum.

**§ 28:**
Greinin hevur til endamáls at tryggja, at allir tilburðir, sum verða fráboðaðir sum arbeiðsskaðar, verða avgjørdir á best møguligum grundarlagi, samstundis sum tað við atliti til tryggjaða verður miðað eftir, at avgerð verður tikin skjótast til ber.

Tá ein tilburður er fráboðaður Vanlukkutryggingarráðnum, og nevndin hevur tikið málið upp til viðgerð, hevur tryggjaði skyldu til at gera eftir øllum teimum í stk. 3 heimilaðu boðunum um ymisk tiltøk, ið kunnu upplýsa málið nærri og staðfesta árinini av tilburðinum. M.a. fyri at tryggja, at manglandi fíggjarorka hins tryggjaða ikki er orsøk til, at tryggjaði ber seg undan at gera eftir boðunum, er tað sambært stk. 4 álagt tryggingarfelagnum at bera útreiðslurnar.

Vanlukkutryggingarráðið hevur ikki treytaleysan rætt til at fáa innlit í allar tær í stk. 1 nevndu upplýsingar. Onnur lóggáva kann áseta, at upplýsingarnar bert kunnu útflýggjast við samtykki frá tí, sum upplýsingarnar viðvíkja. Noktar tryggjaði, at Vanlukkutryggingarráðið fær innlit í tílíkar upplýsingar, kann hetta fáa “processuellan skaðavirkning” fyri tryggjaða, sí nærri §§ 33 og 34.

**§ 29:**
Tað er sjálvsagt av alstórum týdningi fyri tryggjaða – fyrst og fremst fíggjarligum – at hann so skjótt sum til ber fær at vita, um ein fráboðaður tilburður honum viðvíkjandi er ein arbeiðsskaði í lógarinnar týdningi og sostatt møguliga kann geva rætt til tær í lógini heimilaðu veitingarnar. Hinvegin eru málini ofta sera ymisk og kunnu vera meira og minni torfør og tíðarkrevjandi at viðgera, áðrenn staðfestast kann, um tilburðurin er fevndur av lógini. Tær í greinini ásettu tíðarfreistirnar royna at skapa eina javnvág í omanfyrinevndu grundgevingum. Viðmerkjast skal, at hendan greinin bert viðvíkur spurninginum, um ein fráboðaður tilburður er fevndur av lógini

ella ikki. Viðvíkjandi freistum, tá spurningurin er, um ein arbeiðsskaði í lógarinnar týdningi í ávísa førinum hevur havt avleiðingar, ið geva rætt til veitingarnar sambært lógini, verður víst til viðmerkingarnar niðanfyri.

Tá tryggingarskyldugi arbeiðsgevarin sambært § 35, stk. 1 kann kæra avgerðir, tiknar sambært § 29, er tað ein fortreyt, at arbeiðsgevarin verður kunnaður um tiknu avgerðina.

Teir í stk. 2 nevndu tilburðir eru ofta so torførir og tíðarkrevjandi at avgreiða, at freistirnar í stk. 1 ikki eru galdandi fyri støðutakanina til hesar tilburðir. Tá spurningurin um viðurkenning av hesum tilburðum sum arbeiðsskaði hinvegin er avgreiddur, galda tær vanligu freistirnar fyri støðutakanina um endurgjald, sí m.a. §§ 48 og 56.

**§ 30:**
Áðrenn veitingar sambært lógini verða játtaðar, skal endalig greiða vera fingin á, um fráboðaði tilburðurin er fevndur av lógini. Tískil skal tann í lógini ásetta kærufreistin upp á 8 vikur eisini vera runnin, áðrenn tryggjaði fær boð um, at hann fær endurgjald fyri avleiðingarnar av arbeiðsskaðanum. Hetta verður gjørt fyri ikki at "skuffe i retsforhold", soleiðis at ein "berettiget forventning" um endurgjald seinni verður av ongum, tí kærumyndugleikin – mótsett Vanlukkutryggingarráðnum – sýtir fyri at viðurkenna tilburðin sum ein arbeiðsskaða. Greinin er tó ikki galdandi fyri dagpening undir málsviðgerðini, sum júst hevur til endamáls at veita tryggjaða eitt leypandi endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku.

Viðvíkjandi kærufreistini verður víst til § 36.

**§§ 31 og 32:**
Greinirnar áseta eina 5 ára freist fyri uppafturtøku av avgerð Vanlukkutryggingarráðsins um antin at vísa frá sær ein fráboðaðan tilburð sum arbeiðsskaða, ella avgerð um, at avleiðingarnar av einum viðurkendum arbeiðsskaða ikki eru nóg miklar til at geva rætt til veitingar sambært lógini. Áheitanin um uppafturtøku kann koma frá teimum, ið hava fráboðanarskyldu sambært lógini, eins og Vanlukkutryggingarráðið eisini sjálvt kann taka málið upp til nýggja viðgerð, men javnan kemur áheitanin frá tryggjaða sjálvum ella hansara avvarðandi.

**§§ 33 og 34:**
Greinirnar áseta tann "prosessuella skaðavirkningin" fyri tryggjaða ella hansara avvarðandi, um tey ikki taka lut í málsupplýsingini av fráboðaðum málum teimum viðvíkjandi.

Sum áður nevnt, er tað av stórum týdningi, at ein fráboðaður tilburður verður kannaður og upplýstur so skjótt sum til ber fyri at fáa staðfest, um tilburðurin er ein arbeiðsskaði í lógarinnar týdningi, og sum so, hvørjar avleiðingar hetta hevur havt fyri tryggjaða. Skyldur hins tryggjaða sambært § 28, stk. 3 eru eitt hitt týdningarmesta amboðið til tess at fáa greiðu á hesum viðurskiftum, og tískil kann tað fáa óhepnar fíggjarligar avleiðingar fyri tryggjaða ella hansara avvarðandi, um tey ikki lúka sínar skyldur sambært lógini.

5 ára freistin er sett sum evstamark fyri, hvussu leingi ein fráboðaður tilburður kann liggja óviðgjørdur hjá Vanlukkutryggingarráðnum, tí tryggjaði ella hansara avvarðandi t.d. ikki lúka upplýsingarskyldur teirra. Tá 5 ára freistin er farin, verður málið víst burtur, og ongin heimild er í lógini at taka tað uppaftur.

**Kapittul 7: Kæra**

**§§ 35-37:**
Eins og higartil, verður kæruviðgerðin av arbeiðsskaðatryggingarmálum løgd til Ankestyrelsen í Danmark at umsita.

Hetta verður gjørt við atliti til teir sambært lógini tryggjaðu persónarnar, soleiðis at kærumál teirra verða viðgjørd av tí stovninum, sum í løtuni hevur størsta sakkunnleika og royndir á økinum.

Lógskyldug arbeiðsskaðatrygging (vanlukkutrygging) hevur verið føroyskt sermál síðan 1980, men verður tó miðað ímóti, at kærumyndugleikin einaferð frameftir kann flytast til føroyskan myndugleika at umsita.

Bert avgerðir viðvíkjandi teirri lógarkravdu arbeiðsskaðatryggingini og lógarkravdu tryggingini hjá sjálvstøðugt vinnurekandi kunnu kærast til Ankestyrelsen. Sostatt kunnu ummæli Vanlukkutryggingarráðsins upp á teir í § 26, stk. 2 nevndu fyrispurningar ikki kærast til Ankestyrelsen.

At tryggingarskyldugur arbeiðsgevari bert kann kæra tær avgerðir, sum viðvíkja spurninginum, hvørt ein fráboðaður tilburður kann viðurkennast sum ein arbeiðskaði, sbr. § 29, kemst av, at arbeiðsgevarin vanliga ikki verður mettur sum partur í tílíkum málum. Hóast hetta verður hildið, at arbeiðsgevarin skal hava møguleikan at kæra avgerðir, tiknar sambært § 29, tí ein tílík avgerð er altavgerandi fyri, um arbeiðsgevarin hevur ábyrgdina av arbeiðsskaðanum ella ikki.

Fyrisitingarlógin ásetir neyvar reglur um kæruvegleiðing v.m. í avgerðum frá myndugleikunum, og tískil er ikki neyðugt at áseta nakað hesum viðvíkjandi í sjálvari arbeiðsskaðatryggingarlógini. Fyri at Ankestyrelsen skal hava best møguligt grundarlag fyri at taka avgerð í kærumálinum, kann Ankestyrelsen bæði krevja supplerandi upplýsingar og supplerandi kanningar v.m. av tryggjaða. Heimildirnar eru á leið tær somu sum Vanlukkutryggingarráðið hevur sambært § 28, tó merktar av, at talan nú er um kæruviðgerð og ikki 1. instans viðgerð.

Avleiðingin av, at skaddi ella sjúki ikki fylgir boðum frá kærumyndugleikanum, kann vera “processuel skadesvirkning”, t.v.s., at Ankestyrelsen tekur avgerð í málinum grundað á tær upplýsingar, sum eru til taks.

## Kapittul 8: Um veitingarnar

**§ 38:**
Greinin er eitt yvirlit yvir, hvørjar veitingar eru heimilaðar í lógini.

**§ 39:**
Sum frammanundan nevnt, eru tað bert avleiðingarnar av arbeiðsskaðanum, ið kunnu vera grundarlag undir veitingunum, nevndar í 9., 10., 11. og 12. kapitli. Tað merkir m.a., at hóast ein persónur, sum hevur fingið ein viðurkendan arbeiðsskaða, t.d. verður mettur til at vera 70% avlamin, so kann endurgjaldið fyri varandi mein sambært hesi lóg kortini verða roknað við grundarlagi í t.d. 50% avlamni av teirri orsøk, at viðkomandi longu frammanundan arbeiðsskaðan var 20% avlamin.

Stk. 2 og 3 áseta ein “formodning“ um, at ein ávísur skaði ella sjúka eru avleiðingar av einum fráboðaðum arbeiðsskaða. Víst verður annars til § 19.

**§ 40:**
Greinin ásetir, at um ein sambært lógini tryggjaður persónur orsakað av eginskuld hevur verið fyri arbeiðsskaða, kann hetta ávirka rættarstøðu hansara. Tað eru bert tær í greinini nevndu gerðir ella undanlát, sum ávirka rættarstøðuna, eins og tað bert eru tær í greinini nevndu veitingarnar, sum kunnu minkast ella heilt detta burtur. Sostatt vil t.d. rætturin til tær í kapittul 9 nevndu veitingar ikki ávirkast av eginskuld hins tryggjaða, eins og veitingarnar til avvarðandi hjá persóni, sum er deyður av arbeiðsskaða, heldur ikki kunnu minkast ella heilt detta burtur orsakað av eginskuld hins deyða.

**§ 41:**
Sum høvuðsregla verða veitingarnar rindaðar beinleiðis til tann, sum sambært lógini eigur rætt til veitingarnar. Men veitingarnar kunnu eisini t.d. verða útgoldnar í smærri upphæddum enn ásett í lógini, ella latnar til t.d. hjúnafelagan, um Vanlukkutryggingarráðið heldur, at peningurin á hendan hátt kemur tryggjaða betur til góðar.

**§ 42:**
Endurgjald fyri mist arbeiðsføri og endurgjald fyri miss av uppihaldara er tengt at árslønini hjá tryggjaða, meðan hinar veitingarnar verða latnar óheftar av árslønini.

Fyri løntakarar/arbeiðstakarar er útrokningargrundarlagið sum høvuðsregla samlaða ársløn hins tryggjaða inntøkuárið frammanundan arbeiðsskaðanum. Sostatt skal m.a. frítíðarløn eisini íroknast árslønina.

Fyri sjálvstøðugt vinnurekandi verður útrokningargrundarlagið sum høvuðsregla ásett við støði í seinast álíknaða inntøkuárinum.

Er tann soleiðis roknaða ársinntøkan hjá ávikavist løntakarum ella sjálvstøðugt vinnurekandi ikki "repræsentativ" fyri vanligu ársinntøkuna, kann árslønin sambært stk. 4 ásetast eftir nærri meting Vanlukkutryggingarráðsins. Heimildin í stk. 4 kann t.d. verða nýtt, um tryggjaði er um at verða liðugur við útbúgvingina og hevur ítøkilig útlit til eitt arbeiði, ella um seinast álíknaða inntøkuárið hjá einum sjálvstøðugt vinnurekandi hevur verið óvanliga vánaligt.

Hámarkið upp á 350.000 krónur er ásett eftir teirri sannføring, at veruliga ársinntøkan hjá flest møguligum tryggjaðum liggur innan fyri hetta hámark.

**§ 43:**
Við grundarlagi í nevnda sáttmála millum Føroya Arbeiðararfelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag verður hildið, at tær í greinini nevndu veitingar verða javnaðar soleiðis, at upphæddirnar eru nútíðarhóskandi.

Sambært stk. 3 skulu tær upphæddirnar, ið vóru galdandi, tá Vanlukkutryggingarráðið tók avgerð um at veita endurgjald ella samsýning, nýtast sum grundarlag undir játtaðu veitingunum. Sostatt kann tað eisini koma fyri, at tann upphæddin, sum var galdandi, tá arbeiðsskaðin hendi, er lækkað, tá avgerðin um at veita endurgjald verður tikin, tí sáttmálasamráðingarnar millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag hava ført til lønarniðurskurð. Hinvegin kemur tað tryggjaða til góðar, um upphæddirnar hækka í tíðarskeiðnum frá, tá arbeiðsskaðin hendi, og til avgerð um endurgjald verður tikin.

Við at nýta upphæddirnar á avgerðardegnum í staðin fyri dagin, tá arbeiðsskaðin hendi, sleppst undan at rokna rentu í hesum millumbili.

## Kapittul 9: Sjúkuviðgerð, uppvenjing og hjálpitól v.m. undir málsviðgerðini

**§ 44:**
"Undir málsviðgerðini" er tíðarskeiðið frá tí, tilburðurin verður fráboðaður Vanlukkutryggingarráðnum, og til avgerð er tikin um mist arbeiðsføri og varandi mein, ella málið er endað sambært § 32. Er tilburðurin enn ikki viðurkendur sum arbeiðsskaði, tá viðgerð v.m. verður sett í verk, má gjaldsspurningurin bíða, til Vanlukkutryggingarráðið samsvarandi § 29 hevur tikið støðu til viðurkenningina.

Ein onnur høvuðstreyt fyri, at tryggingarfelagið skal rinda útreiðslurnar, er, at viðgerðin v.m. verður mett sum neyðug, til tess at tryggjaði kann fáa best møguligan heilsubata. Henda meting kann sostatt í ávísum førum hava við sær, at tryggjaði verður sendur uttanlands til viðgerðar v.m. Gjaldsskyldan hjá tryggingarfelagnum viðvíkjandi sjúkuviðgerð og uppvenjing (sbr. stk. 1, 1. pkt.) tekur bara við í tann mun, útreiðslurnar ikki verða rindaðar av t.d. sjúkrahúsverkinum, sjúkrakassanum o.ø. Harafturímóti hevur tryggingarfelagið altíð skyldu til at rinda fyri hjálpitól v.m. (sbr. stk. 1, 2. pkt.) uttan mun til, um hjálpitólið heilt ella partvíst kundi verið goldið av øðrum.

Ásetingin viðvíkjandi hjálpitólum er galdandi uttan mun til, um persónskaði er hendur ella ikki, og tískil er tryggingin í hesum førum ein "rein" skaðatrygging (tingsforsikring).

Útreiðslurnar kunnu verða rindaðar, bæði tá málið upprunaliga verður viðgjørt, og tá spurningur um mist arbeiðsføri, sbr. § 53, ella varandi mein, sbr. § 58, verður tikin upp til nýggja viðgerð.

Sum dømi um útreiðslur, sum sambært stk. 4 kunnu rindast, sjálvt um málsviðgerðin er liðug, kunnu t.d. nevnast viðgerðir, sum undir málsviðgerðini eru góðkendar av Vanlukkutryggingarráðnum, men sum t.d. orsakað av bíðilista ikki kunnu fremjast, fyrr enn aftaná málsviðgerðin er endað.

**§ 45:**
Greinin viðger spurningin um uppafturtøku av formligari avgerð um tær í § 44 nevndu útreiðslur. Talan skal vera um munandi broytingar, áðrenn málið verður tikið upp til nýggja viðgerð. Um neyðugt, kann málið fleiri ferðir verða tikið upp til nýggja viðgerð, men 5 ára freistin rennur kortini áhaldandi frá upprunaligu avgerðini, og tískil er í stk. 2 heimild hjá Vanlukkutryggingarráðnum at leingja freistina ella heilt at síggja burtur frá henni, um grundarlag er fyri at halda, at neyðugt er við uppafturtøku, eftir at 5 ára freistin er runnin.

Somu reglur eru eisini galdandi fyri uppafturtøku av spurninginum um mist arbeiðsføri og varandi mein.

## Kapittul 10: Dagpeningur

**§ 46:**

Um tann, sum hevur verið fyri skaða, verður sjúkur eftir arbeiðsskaðan, sjálvt um hesin skaði er fráboðaður ella viðurkendur, hevur viðkomandi rætt til dagpening sambært vanligum reglum í dagpeningalógini og sambært vanligari mannagongd eftir at hava vent sær til Almannastovuna. Uppskot til broyting av dagpeningalógini verður lagt fram, soleiðis at ein serlig heimild verður givin at gjalda dagpening longri enn 40 vikur í málum um arbeiðsskaðar.

Í stk. 2 verður ásett, at um fráboðanin um arbeiðsskaðan seinni verður viðurkend sum arbeiðsskaði sambært hesum lógaruppskoti, kann Almannastovan senda rokningina fyri goldnan dagpening til viðkomandi tryggingarfelag. Tryggingarfelagið hevur eftir hetta skyldu til sambært hesi lóg at gjalda Almannastovuni hesa upphædd aftur.

## Kapittul 11: Endurgjald fyri mist arbeiðsføri

**§ 47:**

Endurgjald fyri mist arbeiðsføri verður latið til tann, sum orsakað av arbeiðsskaða ikki er førur fyri at útinna arbeiðið í sama mun sum áðrenn arbeiðsskaðan. Hóast høvuðsdenturin sostatt verður lagdur á arbeiðsførleikan og ikki arbeiðsinntøkuna, so er tað kortini peningaligi missurin av arbeiðsskaðanum, ið er grundarlagið undir endurgjaldinum fyri mist arbeiðsføri.

Tá støða skal takast til arbeiðsførismissin, má Vanlukkutryggingarráðið í hvørjum føri sær meta um arbeiðs- og inntøkuviðurskiftini hjá viðkomandi skadda ella sjúka áðrenn tilburðin, og samanbera hetta við somu viðurskifti eftir arbeiðsskaðan. Er skaddi ella sjúki eftir arbeiðsskaðan førur fyri at taka upp aftur sama arbeiði og við somu inntøku sum áðrenn arbeiðsskaðan, fær hann onki endurgjald fyri mist arbeiðsføri, sjálvt um hann hevur fingið varandi mein av arbeiðsskaðanum og fær samsýning fyri hetta.

Endurgjald fyri mist arbeiðsføri er ein persónlig veiting, sum annaðhvørt ikki verður útgoldin, ella sum dettur burtur, um viðkomandi skaddi ella sjúki doyr.

**§ 48:**

Endalig avgerð um mist arbeiðsføri hvørki kann ella skal verða tikin, fyrr enn grundarlag er fyri at meta um framtíðar arbeiðsførleikan, og hetta kann ikki staðfestast, fyrr enn heilsustøða hins tryggjaða læknafrøðiliga er støðug og varandi ("stationær").

Tað kann í ávísum førum vera trupult at taka eina endaliga avgerð um mist arbeiðsføri innan 2 ára freistina í stk. 2, og tískil kann Vanlukkutryggingarráðið sambært stk. 4 verða noytt til at taka eina fyribilsavgerð um endurgjald fyri mist arbeiðsføri, hóast málið ikki er endaliga upplýst. Síðani kann málið kannast liðugt og eitt endaligt endurgjald fyri mist arbeiðsføri ásetast. Tá fyribilsendurgjald altíð kann væntast at verða broytt við einari seinni avgerð, verður endurgjaldið altíð veitt sum leypandi veiting.

Sambært stk. 3 kann ein partur av endurgjaldinum eisini verða veitt sum forskot í førum, har givið er, at tryggjaði í øllum førum kemur at fáa eitt endurgjald, svarandi til forskotið. Hóast forskot sostatt verður útgoldið, meðan málið enn er til viðgerðar og tískil kann verða veitt samstundis sum dagpeningur, skal ongin mótrokning gerast millum hesar báðar veitingarnar, tí dagpeningurin er endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, meðan málið er til viðgerðar, meðan forskotið upp á endurgjald fyri mist arbeiðsføri viðvíkur tíðarskeiðinum eftir, at málsviðgerðin er liðug. Forskotið kann umroknast til eina ávísa peningaupphædd eftir ásetingunum í § 51.

15 ára aldursmarkið í stk. 5 kemst av, at eitt barn sjáldan ger brúk av sínum arbeiðsførleika áðrenn hetta tíðarskeið, og tískil ikki kann sigast at hava mist hendan førleika fyrr enn við 15. árinum.

Somu reglur, sum nevndar í stk. 1-3, eru galdandi viðvíkjandi samsýning fyri varandi mein, sí § 56.

**§ 49:**
Endurgjald fyri mist arbeiðsføri verður sum høvuðsregla veitt við grundarlagi í teirri ársinntøku, sum viðkomandi forvann beint frammanundan arbeiðsskaðanum, sbr. § 42, men endurgjaldsupphæddin kann tó ongantíð vera meira enn 80% av hesum útrokningargrundarlagi.

**§ 50:**
Tá endurgjald fyri mist arbeiðsføri kemur í staðin fyri framtíðar arbeiðsinntøku, t.v.s. eftir at endalig avgerð er tikin um arbeiðsførismissin, er útgjaldingin og veitingartíðarskeiðið í høvuðsheitum ásett á sama hátt sum vanligar arbeiðsinntøkur. Veitingin byrjar, tá Vanlukkutryggingarráðið hevur tikið endaliga støðu til spurningin um arbeiðsførismissin, men sambært stk. 2 kann útgjaldingin eisini byrja áðrenn hetta, t.d. um tryggjaði orsakað av arbeiðsskaðanum er farin í annað starv við lægri løn.

Endurgjaldsveitingin fyri mist arbeiðsføri heldur uppat, tá tryggjaði er vorðin 67 ára gamal, tí hetta er eisini vanliga tíðin, tá ein arbeiðsførur persónur gevst at nýta arbeiðsførleika sín og gerst fólkapensjónistur.

**§ 51:**
Ásetingarnar um “kapitalisering”, t.v.s. at ein upprunaliga ásett framhaldandi árlig veiting verður roknað um til eina ávísa peningaupphædd og útgoldin tryggjaða í einum, eru settar inn í lógina við einum forsyrgjarasjónarmiði fyri eyga. Ein persónur, sum framvegis hevur 50% arbeiðsførleika, kann partvíst uppihalda sær sjálvum, og ein eingangsupphædd kann koma einum tílíkum persóni meira til gagns, við at hann t.d. nýtir upphæddina til at byrja egið virki, enn um hann fær eina framhaldandi mánaðarliga veiting, til hann fyllir 67 ár. Hinvegin vil framhaldandi mánaðarliga endurgjaldsveitingin til ein persón, sum bert hevur ein lítlan part av arbeiðsførleikanum eftir, møguliga vera einasta trygga inntøkukeldan, og sostatt eisini vera uppihaldsgrundarlagið hjá viðkomandi.

Høvuðsreglan er, at endurgjaldsveitingin fyri undir 51% óarbeiðsføri verður goldin tryggjaða í einum, ímeðan endurgjald fyri óarbeiðsføri upp á 51% ella hægri verður goldið sum leypandi veiting. Hetta merkir, at tryggjaði fær eina eingangsupphædd, um óarbeiðsførið verður ásett til t.d. 40%, ímeðan tryggjaði fær eina leypandi endurgjaldsveiting, um óarbeiðsførið verður ásett til t.d. 60%. Í seinna førinum kann øll endurgjaldsveitingin tó í serligum førum gjaldast sum eingangsupphædd, hóast óarbeiðsførið er ásett til 60%. Uppihaldssjónarmiðið kann vera ein partur av metingini, um serligar umstøður eru til staðar fyri at umrokna alla endurgjaldsveitingina til eina ávísa peningaupphædd. Jú nærri teimum 51% óarbeiðsførið verður sett til, jú meira talar uppihaldssjónarmiðið fyri, at øll endurgjaldsveitingin verður umroknað til eina ávísa peningaupphædd.

Sum áður nevnt, er endurgjald fyri mist arbeiðsføri ein persónlig veiting, sum dettur burtur, um tann, ið hevur rætt til veitingina, doyr. Hevur viðkomandi longu biðið um at fáa veitingina umroknaða til peningaupphædd, verður upphæddin goldin til deyðsbúgvið, um viðkomandi doyr.

**§ 52:**
Er tryggjaði tænastumaður, ella er viðkomandi settur í starv undir líknandi eftirlønarreglum sum tænastumenn, og fær viðkomandi sum liður í tílíkum setanarviðurskiftum eftirløn orsakað av arbeiðsskaðanum, gongur henda serliga veitingin fram um endurgjaldsveitingina fyri mist arbeiðsføri sambært hesi lóg, soleiðis at endurgjaldið fyri mist arbeiðsføri verður minkað samsvarandi hesi grein.

Sama er galdandi viðvíkjandi endurgjaldi fyri miss av uppihaldara, sbr. § 72.

**§ 53:**
Greinin er javnlík § 45, og víst verður tí til hesa grein.

**§ 54:**
Tann, ið samsvarandi reglunum í hesum kapitli fær framhaldandi árligt endurgjald fyri mist arbeiðsføri, skal boða Vanlukkutryggingarráðnum frá øllum broytingum í viðurskiftum sínum, ið kunnu ávirka upprunaliga ásettu endurgjaldsveitingina, soleiðis at upphæddin frameftir verður lægri. Vanliga verður endurgjaldsupphæddin ikki lækkað eftir, at 5 ára freistin í § 53 er runnin.

Sambært stk. 2 skulu Vanlukkutryggingarráðið og tryggingarfelagið eisini endurskoða avgerðir sínar við atliti til møguligar broytingar í endurgjaldsveitingini.

Stk. 3 ásetir avleiðingarnar av, at tryggjaði – hóast hann visti betur – ikki gevur boð um viðkomandi broytingar í viðurskiftum sínum.

## Kapittul 12: Samsýning fyri varandi mein

**§ 55:**
Veitingin fyri varandi mein er ikki eitt endurgjald, sum er tengt at fíggjarviðurskiftum hins tryggjaða, men er ein samsýning fyri varandi mein orsakað av arbeiðsskaðanum, sum á ein hvønn hátt ávirkar persónligu tilveruna hjá viðkomandi. Talan kann bæði vera um likamligt og sálarligt mein, sum t.d. niðursetta sjón ella hoyrn, ella sjónlig arr, ið gera, at viðkomandi kennir seg illa, tá hann er saman við øðrum fólki. Varandi mein hevur í høvuðsheitum somu likamligu og sálarligu ávirkan á ein hvønn persón, uttan mun til arbeiði, kyn, aldur ella bústað, og tískil er samsýningin fyri varandi mein “standardiserað” í einari “meintalvu”, ið neyvt ásetir eitt ávíst mein til ein ávísan %-part av 100%. Talvan er tó ikki fullfíggjað, og samsýning fyri varandi mein, ið ikki er nevnt í talvuni, kann ásetast eftir meting. Samsýning verður tó ongantíð latin fyri mein undir 5%.

**§ 56:**
Greinin ásetir somu reglur, sum nevndar í § 48, stk. 1-3, og víst verður tí til hesa grein.

**§ 57:**
Tá samsýning fyri varandi mein ikki er tengd at arbeiðsføri ella arbeiðsinntøku, og sostatt ikki hevur eitt uppihaldsendamál eins og endurgjaldið fyri mist arbeiðsføri, verður samsýningin – alt eftir meinstiginum – altíð latin sum ein ávís peningaupphædd og goldin tryggjaða í einum. Tann í heilt serligum førum hækkaða samsýningin upp á 120% kann t.d. verða nýtt í sambandi við “kombinerað” mein, t.d. fullkomiliga mista sjón og hoyrn.

Ásetingin í stk. 3 um lækking av veitingini merkir ikki, at meinstigið verður lækkað við 5% fyri hvørt árið, tryggjaði er eldri enn 59 ár, men harafturímóti, at tann upprunaligt ásetta samsýningarupphæddin verður lækkað.

**§ 58:**
Greinin hevur sama innihald sum **§** 45 (og § 53), og víst verður tí til viðmerkingarnar til hesar greinar.

**Kapittul 13: Skiftisveiting til eftirsitandi**

**<u>§§ 59 og 60:</u>**
Doyr tryggjaði antin beinanvegin ella seinni orsakað av arbeiðsskaðanum, kunnu eftirsitandi fáa bæði skiftisveiting sambært hesum kapitli og endurgjald fyri miss av uppihaldara sambært 14. kapitli.

Skiftisveitingin sambært hesum kapitli verður altíð latin til teir í kapitlinum nevndu persónarnar, uttan mun til, um hesir persónar hava verið fyri fíggjarligum missi orsakað av deyðsfallinum, eins og skiftisveitingin altíð verður latin sum ein føst upphædd, ið er óheft av ársinntøku hins deyða. Skiftisveitingin skal fíggjarliga hjálpa teimum eftirsitandi at umstilla seg til eina nýggja tilveru, samstundis sum veitingin er ætlað til at bera útreiðslurnar av m.a. jarðarferð hins deyða. Skiftisveitingin verður latin til bæði einkju og einkjumann. Høvuðstreytin í greinini er annars, at partarnir í veruleikanum livdu saman, tá deyðsfallið hendi. Tað merkir m.a., at ein hjúnafelagi, sum enn var giftur við tí deyða, men sum orsakað av sundurlesing ikki livdi saman við hjúnafelaganum, tá deyðsfallið hendi, ikki hevur rætt til skiftisveiting.

Tað kann vera trupult at avgera, nær tveir persónar kunnu sigast at liva saman, men vegleiðandi kann nevnast, at persónarnir mugu hava felags bústað, felags húsarhald og felags búskap.

**<u>§ 61:</u>**
Greinin heimilar Vanlukkutryggingarráðnum at játta skiftisveiting í øðrum førum, enn nevnt í §§ 59 og 60. Talan kann t.d. vera um persón, sum ikki lýkur 2 ára freistirnar í omanfyri nevndu greinum, men sum t.d. av felags børnum ella felags húsi kortini hevur eins stóran tørv á skiftisveitingini sum teir persónar, ið lúka treytirnar. Hinvegin er tað ikki ein treyt fyri at fáa skiftisveiting eftir hesi grein, at viðkomandi persónur og tann deyði livdu saman sum par; eisini aðrir persónar t.d. familja, sum í mong ár hevur búð saman og havt felags húsarhald við tí deyða, kunnu eftir umstøðunum fáa skiftisveiting eftir hesi grein.

**<u>§ 62:</u>**
Vanliga førir tað ikki stórvegis trupulleikar við sær at staðfesta, um ein persónur hevur rætt til skiftisveiting. Tá skiftisveitingin heldur ikki verður latin í sambandi við ávísan fíggjarligan miss, eins og veitingin heldur ikki altíð hevur grundarlag í versnaðum fíggjarviðurskiftum, eru tað ikki ásettar nakrar reglur um forskot og fyribilsveiting í hesum føri.

**Kapittul 14: Endurgjald fyri miss av uppihaldara**

**<u>§ 63:</u>**
Endurgjald fyri miss av uppihaldara er, eins og skiftisveitingin, ikki treytað av versnaðum fíggjarviðurskiftum hjá tí eftirsitandi. Hinvegin er endurgjaldsupphæddin tengd at teirri sambært § 42 roknaðu ársinntøku hins deyða.

Ein "uppihaldari" er í lógarinnar týdningi ikki bert ein persónur, sum sambært lóg hevur uppihaldsskyldu, men eisini ein persónur, sum í veruleikanum uppiheldur einum øðrum persóni uttan at hava skyldu til tess. Tað er ein treyt fyri at fáa endurgjald fyri miss av uppihaldara, at viðkomandi samstundis hevur rætt til skiftisveiting, sbr. kapittul 13.

At víst verður til §§ 59 og 60 merkir, at bæði hjúnafelagi og persónar, sum tann deyði livdi saman við undir hjúnabandslíknandi viðurskiftum, kunnu fáa endurgjald fyri miss av uppihaldara.

Orsøkin til, at teir í § 61 nevndu persónar ikki hava rætt til endurgjald fyri miss av uppihaldara, hóast teir hava rætt til skiftisveiting, er tann, at hesir persónar vanliga ikki hava verið uppihildnir av hinum deyða, hóast teir búðu undir sama taki.

**§ 64:**
Sambært stk. 1 er árliga endurgjaldsupphæddin altíð tann sama, nevniliga 30% av ársløn hins deyða. Áramálið, har veitingin verður latin, kann vera upp til 10 ár, og í ongum førum meira enn 10 ár.

10 ára veitingarhámarkið gevur Vanlukkutryggingarráðnum møguleika fyri at seta veitingartíðarskeiðið í mun til framtíðar fíggjarvánirnar hjá tí eftirsitandi, har m.a. hugt kann verða eftir uppihaldskyldum, inntøkuviðurskiftum, lánsbyrðum v.m.

Tann í stk. 3 nevnda eftirsitilønin kann t.d. vera tann í § 7 í ll. nr. 13 frá 20.03.1958 um starvsmenn ásetta veitingin til eftirsitandi orsakað av deyða starvsmansins.

Eins og stk. 3 staðfestir stk. 4 eisini, at fíggjarligu avleiðingarnar av andlátinum ikki kunnu sigast at vera versnaðar, fyrr enn beinleiðis inntøka hins deyða er hildin uppat.

Øll tann framhaldandi veitingin kann sambært stk. 5 verða roknað um til peningaupphædd – sbr. § 51 – eftir ynski frá móttakaranum. Veitingin heldur uppat, um móttakarin doyr, innan ásetta veitingartíðarskeiðið er runnið.

**§ 65:**
Ein leingjan av veitingartíðarskeiðinum fyri miss av uppihaldara er treytað av, at fíggjarviðurskiftini hjá tí eftirsitandi eru verri enn upprunaliga mett. Veitingartíðarskeiðið kann tó í ongum førum vera ásett longri enn til samanlagt 10 ár.

Sambært orðaljóðinum í greinini – samanhildið við § 64, stk. 5 – er tað hinvegin ikki heimild hjá Vanlukkutryggingarráðnum at stytta eitt longu ásett veitingartíðarskeið, hóast fíggjarvánirnar hjá tí eftirsitandi antin eru betri enn upprunaliga mett, ella eru batnaðar aftaná upprunaliga ásetta veitingartíðarskeiðið.

**§ 66:**
Víst verður til § 50, stk. 3.

**§ 67:**
Eins og viðvíkjandi endurgjaldinum til vaksin fyri miss av uppihaldara, er endurgjaldið til børn fyri miss av uppihaldara heldur ikki tengt at fíggjarviðurskiftunum hjá barninum. Men fyri at eitt barn skal hava rætt til endurgjald, er tað ein treyt, at hin deyði sambært aðrari lóggávu hevði uppihaldsskyldu mótvegis barninum, t.v.s. faktiskt uppihald er ikki nóg mikið. Hetta merkir t.d., at egin børn, fødd í ella uttan fyri hjúnaband, og ættleidd børn kunnu fáa endurgjald eftir hesi grein, meðan eitt stjúkbarn bert kann fáa endurgjald, um treytirnar í § 70 eru loknar. Endurgjaldsveitingin verður eisini ávirkað av, um barnið framvegis hevur hitt av foreldrunum á lívi, av orsøkini til andlátið, um hin deyði var eina uppihaldari mótvegis barninum, ella um barnið er undir útbúgving. Í øllum førum verður endurgjaldsveitingin tó latin, til barnið verður 18 ár.

Í samsvari við uppihaldssjónarmiðið verður endurgjald til børn fyri miss av uppihaldara altíð veitt sum framhaldandi veiting og kann undir ongum umstøðum roknast um til eina ávísa peningaupphædd.

**§ 68 :**
Víst verður til § 64.

**§ 69:**
Hámarkið fyri endurgjaldsupphæddina til børn upp á ávikavist 50 og 60% av teirri sambært § 42 roknaðu ársløn hins deyða er ásett við atliti til, at børn vanliga ikki hava somu fíggjarligu skyldur sum vaksin, og tískil ikki hava tørv á eins stórari fíggjarorku sum vaksin.

Er talan um bara tað eina barnið, kann endurgjaldið ikki fara upp um hetta hámark, men er talan um tvey ella fleiri børn, lækka einstøku veitingarnar til børnini til samanlagt 60/50%.

Lækkingin av endurgjaldinum til barnið, sbr. stk. 2, er ásett við tí fyri eyga, at eitt endurgjald til tann vaksna sambært § 63, sbr. § 64 , eisini kemur barninum til góðar.

**§ 70:**
Greinin heimilar, at eisini aðrir persónar, enn teir í §§ 61 og 66 nevndu, undir serligum umstøðum kunnu fáa endurgjald fyri miss av uppihaldara. Endurgjald eftir hesi grein er treytað av, at hin deyði heilt ella partvíst uppihelt viðkomandi, og at samlaðu veitingarnar fyri miss av uppihaldara eftir hesum kapitli ikki fara upp um 70% av ársløn hins deyða, roknað samsvarandi § 42. Endurgjald kann t.d. verða veitt stjúkbørnum, fráskildum ella sundurlisnum hjúnafelaga, foreldrum ella systkjum.

Greinin ásetir ongar reglur um veitingartíðarskeiðið, og hetta má tískil ásetast av Vanlukkutryggingarráðnum í hvørjum einstøkum føri sær.

**§ 71:**
Greinin ásetir somu freistir fyri avgerð, sum viðvíkjandi missi av arbeiðsføri, sbr. § 48, stk. 2, og varandi mein, sbr. § 56, stk. 2.

**§ 72:**
Víst verður til § 52.

**Kapittul 15: Aftursóknarkrøv, vangilding og revsing v.m.**

**§§ 73 og 74:**
Sum áður nevnt undir almennu viðmerkingunum, er henda lógin nær tengd at endurgjaldsábyrgdarlógini soleiðis at skilja, at fleiri av heimilaðu veitingunum eru tær somu, hóast upphæddirnar og útrokningarhátturin ikki eru eins í øllum førum. Endurgjaldsábyrgdarlógin ásetir generellu endurgjaldsábyrgdina hjá skaðaelvara mótvegis skadda, meðan arbeiðsskaðatryggingarlógin er ein serlig lóg, sum í høvuðsheitum bert viðger endurgjaldsábyrgdina hjá arbeiðsgevarum mótvegis arbeiðstakarum sínum. Høvuðsendamálið við arbeiðsskaðatryggingarlógini er at tryggja, at allir arbeiðstakarar veruliga fáa endurgjald fyri arbeiðsskaðar frá einum tryggingarfelag, sum arbeiðsgevarin hevur skyldu at tekna trygging hjá, soleiðis at arbeiðstakarin altíð fær endurgjaldið útgoldið, uttan mun til um arbeiðsgevarin er førur fyri at gjalda ella ikki.

§ 73 ásetir fyri tað fyrsta, at arbeiðsskaðatryggingarfelagið ikki kann seta aftursóknarkrav fram móti skaðaelvandi arbeiðsgevara, tí arbeiðsgevarin hevur við tryggingargjøldum sínum flutt endaliga ábyrgdarvanda sín yvir á tryggingarfelagið.

Harnæst ásetir greinin, at veitingar eftir arbeiðsskaðatryggingarlógini ganga fram um veitingar eftir endurgjaldsábyrgdarlógini, soleiðis at endurgjaldskravið móti skaðaelvaranum (t.v.s. arbeiðsgevaranum í hesum førinum) lækkar samsvarandi teimum veitingum, sum tryggjaði fær við heimild í hesi lóg. Hinvegin er onki sum forðar fyri, at tryggjaði – við heimild í endurgjaldsábyrgdarlógini – krevur tann partin av samlaða endurgjaldinum ella samsýningini, sum ikki verður goldin eftir hesi lóg, frá skaðaelvaranum (sokallaðan “differenceerstatning”).

§ 74 viðger ta øvugtu støðuna, nevnliga at tryggjaði longu hevur fingið endurgjald við heimild í endurgjaldsábyrgdarlógini, tá veitingarnar sambært hesi lóg verða játtaðar. Í hesum førinum skal arbeiðsskaðatryggingarfelagið endurrinda skaðaelvara ella ábyrgdartryggingarfelag hansara ta upphæddina.

**§ 75:**

Rúm tíð kann ganga frá tí, ein tilburður verður fráboðaður Vanlukkutryggingarráðnum sum arbeiðsskaði, og til játtanir um veitingar eftir hesi lóg verða givnar. Í hesum tíðarskeiðinum kann skaddi ella sjúki hava fingið ymiskar veitingar – burtursæð frá dagpeningi sambært dagpeningalógini – eftir aðrari almannalóggávu.

Greinin gevur bert heimild fyri aftursóknarkrøvum frá Almannastovuni mótvegis tryggingarfelagnum, meðan spurningurin, um almannahjálpin í einstaka førinum skal krevjast aftur, verður viðgjørdur í teirri lóggávuni, sum heimilar almannaveitingina.

Aftursóknarkrav kann bert setast fram móti leypandi veitingum og ikki kapitalveitingum, og kravið er tíðaravmarkað til tað tíðarskeið, tann leypandi veitingin skuldi vara.

**§ 76:**

Greinin ásetir, at lógin er “beskyttelsespræseptiv”, t.v.s., at ásetingarnar í lógini ikki við avtalu millum tann tryggingarskylduga og tann tryggjaða kunnu frávíkjast til skaða fyri tann tryggjaða.

**§ 77:**

Greinin viðvíkur leypandi veitingum og er bert galdandi, so leingi veitingarnar ikki eru falnar til gjaldingar. Verjanin móti rættarsókn er tó ikki fullkomin í tann mun, øðrvísi reglur eru ásettar í øðrum lógum.

Í veitingum, sum eru kapitaliseraðar, kunnu bert forskot, goldin av tryggingarfelag, verða mótroknað.

**§ 78:**

Tá arbeiðsgevarin og tann sjálvstøðugt vinnurekandi bert kunnu vera álagdir sektarábyrgd, t.v.s. bót, skulu brot á tær í greinini nevndu ásetingar meldast til løgregluna og viðgerast sum politimál sambært rættargangslógini.

Læknar og tannlæknar, sum sambært § 24, stk. 3 eisini hava fráboðanarskyldu um arbeiðsskaðar, kunnu ikki revsast fyri misrøking av hesi skyldu.

Stk. 3 heimilar sektarásetingar fyri brot á kunngerðir, givnar við heimild í lógini.

**Kapittul 16: Gildiskomu- og skiftisreglur**

**§ 79:**
Ásetingarnar í lógini hava í fyrsta lagi virknað frá tí degi, lógin kemur í gildi.

Skeringsdagurin er sum høvuðsregla tann dagurin, tá tilburðurin hendi, men í sambandi við vinnusjúkur er neyðugt at gera undantak frá hesi høvuðsreglu, tí torført kann vera at staðfesta, nær ein vinnusjúka er hend, og tískil verður fráboðanardagurin í hesum førum nýttur sum skeringsdagur.

Teir tilburðir, sum eru hendir ella fráboðaðir innan gildiskomudagin, eins og tey mál, sum framvegis eru undir viðgerð, tá henda lógin kemur í gildi, verða framhaldandi viðgjørd eftir ásetingunum í kongligu fyriskipanini um vanlukkutrygging.

**§ 80:**
Løgtingslógin skal endurskoðast 3 ár eftir, at lógin er sett í gildi. Hetta fyri at meta um, hvørt lógin virkar eftir ætlan, ella um broytingar skulu gerast fyri at betra um skipanina. Mett verður, at eftir at lógin hevur virkað í 3 ár, er skipanin komin í gongd, og møguligt er at eftirmeta skipanina.

Vinnumálaráðið xx. xxxx 2006

Bjarni Djurholm
landsstýrismaður

/Arne Poulsen